# Nýtslureglugerð til at seta í verk sáttmálan um verju av siðaarvi

Samtykt av Aðalfundinum hjá limalondunum í teirra aðru setu (UNESCO høvuðssæti, París 16. til 19. juni 2008), broytt í triðju setu (UNESCO høvuðssæti, París 22. til 24. juni 2010) í fjórðu setu (UNESCO høvuðssæti, París 4.til 8. juni 2012), í fimtu setu (UNESCO høvuðssæti, París 2. til 4. juni 2014), í sættu setu (UNESCO høvuðssæti, París 30.mai til 1. juni 2016) og teirra sjeyndu setu (UNESCO høvuðssæti, París 4. til 6.juni 2018)


**Kapittul 1** **Reglubrot**

**At verja tann siðarvin á altjóða støði, samstarv og altjóða stuðul** **1-65**

I.1 Treytir fyri innskriving á Listan fyri siðaarv, við bráðneyðugum tørvi á verju. 1

I.2 Treytir fyri innskriving á Umboðandi listan við mannaættarinnar siðaarvi. 2

I.3 Treytir fyri at velja ætlan, verkætlan og virksemi, sum best endurspegla grundreglur og endamál í Sáttmálanum. 3-7

I.4 Valbæri og valtreytir fyri altjóða stuðulsumsóknir 8-12

I.5 Fleirtjóða umsóknir 3-15

I.6 Innskriving á víðkaðum ella avmarkaðum støði 16-19

I.7 At lata umsóknir inn 20-25

8 At meta um umsóknir 26-31

I.9 Tilnevningar til Listan fyri siðaarv við bráðneyðugan tørvi á verju, sum skula viðgerast við sera stórum skundi 32

I.10 Nevndargjøgnumgongd av umsóknum 33-37

I.11 At flyta eitt fyribrigdi av einum Lista á hin ella taka eitt fyribrigdi av Lista 38-40

I.12 At broyta navnið á einum innskrivaðum fyribrigdi 41

I.13 Ætlanir, verkætlanir og virksemi, útvalt sum best endurspeglandi grundreglur og endamál í sáttmálanum 42-46

I.14 Altjóðastuðul 47-53

I.15 Tíðartalva – yvirlit yvir mannagongdir 54-56

I.16 At innseta fyribrigdi søgd at vera "Meistarverk í mannaættarinnar munnborna og óítøkiliga mentanararvi" á Umboðandi listan fyri mannaættarinnar siðaarvi. 57-65

**Kap. II Mentanargrunnurin fyri siðaarv 66-78**

II.1 Leiðreglur um nýtslu av tilfeingi grunsins 66-67

II.2 Amboð til at vaksa um tilfeingi hjá Mentanargrunninum fyri siðaarvin 68-78

II.2.1 Stuðlar 68-71

II.2.2 Treytir 72-75

II.2.3 Ágóði til stuðlar 76-78

**Kap III At taka lut í íverksetan av Sáttmálanum 79-99**

III.1 Felagsskapir, bólkar og - har tað er hóskandi - einstaklingar eins væl og serfrøðingar, serkønir stovnar og granskingarstovnar taka lut. 79-89

III.2 Ikki-stjórnarligir felagsskapir og Sáttmálin 90-99

III.2.1 Ikki-stjórnarligir felagsskapir taka lut á landsstøði 90

III.2.2 Viðurkendir ikki-stjórnarligir felagsskapir taka lut 91-99

**Kap IV At vekja tilvitsku um siðaarvin og nýtslu av merkið fyri Sáttmálan um verju av siðaarvi 100-150**

IV.1 At vekja tilvitsku um siðaarvin 100-123

IV.1.1 Almennar ásetingar 100-102

IV.1.2 Staðarstøði og landsstøði 103-117

IV.1.3 Altjóðastøði 118-123

IV.2 At nýta merkið fyri Sáttmálan um verju av siðaarvi 124-150

IV.2.1 Allýsing 124-125

IV.2.2 Reglur galdandi fyri at nýta ávikavist búmerkið hjá UNESCO og búmerkið hjá Sáttmálanum við virðing 126-128

IV.2.3 Nýtslurættindi 129

IV.2.4 Heimild 130-136

IV.2.5 Krøv og treytir fyri at nýta búmerkið í stuðulshøpi 137-139

IV.2.6 Handilslig nýtsla og sáttmálabundið virksemi 140-143

IV.2.7 Grafisk fyrsisett mát 144

IV.2.8 Verja 145-150

**Kap V Fráboðan til Nevndina**

V.1 Fráboðan frá limalondunum viðvíkjandi íverksetan av Sáttmálanum 151-159

V.2 Fráboðan frá limalondunum viðvíkjandi fyribrigdum, sum eru innskrivað á Listan fyri siðaarvi, við bráðneyðugum tørvi á verju. 160-164

V.3 At taka ímóti og viðgera frágreiðingar 165-167

V.4 Fráboðan frá statum, sum ikki eru sáttmálapartar, viðvíkjandi fyribrigdum á Umboðandi listanum við mannaættarinnar siðaarvi. 168-169

**Kap VI At verja siðaarv og burðardygga menning á tjóðarstøði 170-197**

VI.1 Umfatandi sosial menning 177-182

VI.1.1 Matvørutrygd 178

VI.1.2 Heilsurøkt 179

VI.1.3 Dygdargóð útbúgving 180

VI.1.4 Kynsjavnstøða 181

VI.1.5 Atgongd til reint og gott vatn og burðardygga vatnnýtslu 182

VI.2 Umfatandi fíggjarlig menning 183-187

VI.2.1 Inntøkuskapan og burðardygt lívsgrundarlag 182

VI.2.2 Skapandi starv og sømiligt arbeiði 186

VI.2.3 Ávirkan av ferðavinnu á verju av siðaarvi og øvugt 187

VI.3 Umhvørvisburðardygd 188-191

VI.3.1 Vitan og virki viðvíkjandi náttúruni og alheiminum 189

VI.3.2 Umhvørvisávirkan av at verja siðaarv 190

VI.3.3 Samfelagsins mótstøðuføri í náttúruvanlukkum og veðurlagsbroytingum 191

VI.4 Siðaarvur og friður 192-197

VI.4.1 Sosial samanhangsmegi og rættvísi 194
VI.4.2 At fyribyrgja og loysa ósemjur 195
VI.4.3 At endurskapa frið og trygd 196
VI.4.4 At fremja varandi frið 197

**STYTTINGAR**

| | |
|---|---|
| Nevnd (Committee) | Millumstjórnarlig nevnd fyri at verja siðaarv |
| Sáttmáli (Convention) | Sáttmálin fyri verju av siðaarvi |
| Aðalstjóri (Director-General) | Aðalstjórin í UNESCO |
| Grunnur (fund) | Grunnur fyri siðaarv |
| Aðalfundur (General Assembly) | Aðalfundurin hjá limalondunum |
| Meistaraverk (Masterpieces) | Meistaraverk í mannaættarinnar óítøkiliga mentanararvi |
| Limaland (state party) | Statssáttmálapartur til at verja siðaarv |
| UNESCO | United Nations Educational, Scientific and Cultural Organization |

## KAPITTUL I At verja siðaarvin á altjóða støði, samstarv og altjóða stuðul

I.1 Treytir fyri innskriving á Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju

1. Í tilnevndum umsóknum  skal/skula umsøkjandi limaland/-lond ávísa, at eitt fyribrigdi í uppskoti til innskriving á Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju lýkur øll hesi krøv:

**U.1** Fyribrigdið fevnir um siðaarv, sum hann er allýstur í grein 2 í Sáttmálanum.

**U.2** **(a)** Fyribrigdið hevur bráðneyðugan tørv á verju, tí tess lívførið er í vanda, hóast samfelagið, bólkurin ella – um hóskandi – einstaklingar og limaland/-lond hava stríðst; ella

**(b)** Fyribrigdið hevur sera bráðneyðugan tørv á verju, tí tað er undir stórum trýsti og kann tessvegna væntandi ikki yvirliva, um ikki verjuátøk verða veitt í stundini.

**U.3** Ein verjuætlan verður evnað til, sum kann gera tey før fyri í samfelagnum, bólkinum ella – um tað er hóskandi – millum einstaklingar at halda fram við siðvenjuni og lata fyribrigdið fara í arv.

**U.4** Fyribrigdið er tilnevnt av so mongum sum gjørligt í samfelagnum, bólkinum ella – um hóskandi – millum einstaklingar og við teirra fría og upplýsta samtykki frammanundan.

**U.5** Fyribrigdið er tikið við á skrá við siðaarvi, sum finst í økinum(økjunum) hjá tilnevnandi limalandinum/-londunum, sum ásett í grein 11 og 12 í Sáttmálanum.

**U.6** Í ovurhonds bráðneyðugum førum er(u) ráðlagt við limalandið/londini viðvíkjandi innskriving av fyribrigdinum í samsvar við grein 17.3 í Sáttmálanum.

### I.2 Treytir fyri innskriving á Umboðandi listan fyri siðaarv hjá mannaættina

2. Í tilnevndum umsóknum  skal/skula umsøkjandi limaland/-lond ávísa, at eitt fyribrigdi í uppskoti til innskriving á Umboðandi listan fyri siðaarvi lýkur øll hesi krøv:

**R.1** Fyribrigdið fevnir um siðaarv, sum hann er allýstur í grein 2 í Sáttmálanum.

**R.2** At skriva fyribrigdið á listan fer at vera við til at vísa, hvønn týdning siðaarvur hevur og vaksa um vitan tí viðvíkjandi og harafturat eggja til samskifti. Hetta skal endurspegla mentanarligt fjølbroytni um allan heim og vitna um menniskjans skaparevni.

**R.3** Verjuátøk verða evnað til, sum kunna verja og fremja fyribrigdið.

**R.4** Fyribrigdið er tilnevnt av so mongum sum gjørligt í samfelagnum, bólkinum ella – um hóskandi – millum einstaklingar við áhuga og við teirra fría og upplýsta samtykki frammanundan.

**R.5** Fyribrigdið er tikið við á skrá fyri siðaarvi, sum finst í økinum(økjunum) hjá tilnevnandi limalandinum/- londunum, sum ásett í grein 11 og 12 í Sáttmálanum.

I.3 Treytir fyri at velja ætlan, verkætlan og virksemi, sum best endurspegla grundreglur og endamál sáttmálanum

3. Limalond verða eggjaði til at koma við uppskotum til val- og framløgunevndina um ætlanir, verkætlanir og virksemi til at verja siðaarv, sum best endurspegla grundreglur og endamál í Sáttmálanum. Uppskotini kunna vera á lands-, landsparta- ella økisstøði.

4. Í hvørjari setu kann Nevndin beinleiðis innkalla uppskot, sum viðgera altjóða samstarv, sum nevnt í grein 19 í sáttmálanum, og/ella sum leggja dent á serstøk høgt raðfest evni í verjuhøpi.

5. Slíkar ætlanir, verkætlanir og slíkt virksemi kann vera liðugt ella í gongd, tá ið uppskot verður latið val- og framløgunevndini.

6. Tá ið hon velur og leggur ætlanir, verkætlanir og virksemi fram, skal nevndin serstakliga geva sær far um tørvin í menningarlondum og meginregluna um javnt landsfrøðiligt býti og samstundis styrkja suður-suður og norður-suður-suður samstarv.

7. Burtur úr ætlanum, verkætlanum og virksemi, sum nevndin hevur fingið sum uppskot, skal Nevndin velja tey, ið á bestan hátt lúka øll hesi krøv:

**P.1** Ætlanin, verkætlanin ella virksemið fevnir um verju sum allýst í grein 2.3 í Sáttmálanum.

**P.2** Ætlanin, verkætlanin ella virksemið fremur arbeiðssamskipan, sum verjur siðaarv á lands-, landsparta og altjóða støði.

**P.3** Ætlanin, verkætlanin ella virksemið speglar meginreglur og endamál í Sáttmálanum.

**P.4** Ætlanin, verkætlanin ella virksemið hevur prógvað sítt virði og latið sín lut til lívføri, tá ið tað ræður um siðaarv.

**P.5** Ætlanin, verkætlanin ella virksemið verður ella er vorðið sett í verk av samfelagnum, bólkinum ella – um hóskandi – millum viðkomandi einstaklingar og við teirra fría og upplýsta samtykki frammanundan.

**P.6** Ætlanin, verkætlanin ella virksemið kann nýtast sum landsparta-, lands- ella altjóða fyrimynd, sum tað nú hóskar, til verjuvirksemi.

**P.7** Umsøkjandi limalond, íverksetandi partar, samfelag, bólkur ella - um hóskandi – viðkomandi einstaklingar eru fús at samstarva um at besti arbeiðsháttur verður breiddur víða út, um teirra ætlan, verkætlan ella virksemi verður valt.

**P.8** Ætlanin, verkætlanin ella virksemið bjóðar royndir, hvørs úrslit ber til at meta.

**P.9** Ætlanin, verkætlanin ella virksemið er fyrst og fremst nýtiligt í menningarlondum við serstøkum tørvi.

**I.**4 Valbæri og valtreytir fyri altjóða stuðulsumsóknir

8. Øll limalond hava heimild til at søkja um altjóða stuðul. Altjóða stuðul, sum er veittur limalondum til at verja siðaarv, er ískoyti til landsins avrik viðvíkjandi verju.

9. Nevndin kann taka ímóti, kanna og góðtaka umsóknir til eitt og hvørt átak og alt slag av altjóða stuðli, sum er nevnt í ávikavist grein 20 og 21 í sáttmálanum, treytað av tøkum tilfeingi. Hægst raðfesting fáa umsóknir um altjóða stuðul viðvíkjandi:

(a) at verja arvin, sum er innskrivaður á Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju;

(b) at fyrireika skráseting sum nevnt í grein 11 og 12 í sáttmálanum;

(c) stuðli til ætlanir, verkætlanir ella virksemi, sum verður framt á lands-, landsparta- og økisstøði til tess at verja siðaarv;

(d) fyrireikandi stuðli.

10. Tá ið Nevndin kannar umsóknir um altjóða stuðul, skal hon taka atlit til meginregluna um landafrøðiligt javnt býti og tann serliga tørv, sum er í menningarlondum. Nevndin kann eisini geva sær far um:

(a) um umsóknin ber við sær samstarv á tvíparta-, økis- ella altjóða støði; og/ella

(b) um hjálpin kann hava breiðari virknað og møguliga stimbra fíggjarligan og tøkniligan stuðul frá øðrum keldum.

11. Altjóða stuðul, sum lýst í grein 20 og 21 í Sáttmálanum, kann verða játtaður sum ein neyðhjálp, sum nevnt í grein 22 í Sáttmálanum (neyðhjálp).

12. Nevndin skal grunda sínar avgerðir um stuðulsveiting á hesar treytir:

**A.1** Samfelagið, bólkurin og/ella - um hóskandi – viðkomandi einstaklingar hava verið við til at fyrireika umsóknina og fara at verða við, tá ið tað uppskotna virksemið verður sett í verk og í eftirmeting og framhaldi so breitt sum gjørligt.

**A.2** Nøgdin av stuðli, sum søkt verður um, er hóskandi.

**A.3** Tað uppskotna virksemið er væl gjøgnumhugsað og gjørligt.

**A.4** Verkætlanin gevur møguliga varandi úrslit.

**A.5** Limaland, sum fær stuðul, er við til at gjalda virksemið, sum er umfatað av altjóða stuðlinum, so langt sum tilfeingið røkkur.

**A.6** Stuðulin er ætlaður til byggja ella styrkja førleikar, sum skula til at verja siðaarv.

**A.7** Limaland, sum fær stuðul, hevur áður sett í verk og fíggjað virksemi, um nakað slíkt hevur verið, og fylgt øllum reglum og treytum í tí sambandi.

I.5 Altjóða umsóknir

13. Limalond verða eggjað til í felag at lata fleirtjóða tilnevningar til *Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju* og *Umboðandi listan við mannaættarinnar siðaarv*, tá ið eitthvørt fyribrigdi verður funnið á økinum hjá meira enn einum limalandi.

14. Nevndin eggjar til, at landspartar ella øki tilnevna bæði ætlan, verkætlan og virksemi í sínum øki og slíkt, sum er sett í verk av limalondum í landafrøðiliga ymiskum øki. Limalond kunna senda hesi uppskot hvør sær ella í felag.

15. Tveir ella fleiri limalond kunna í felag senda áheitanir til Nevndina um altjóða stuðul.

I.6 Innskriving á víðkaðum ella avmarkaðum støði

16. At innskriva eitt fyribrigdi á *Listan fyri siðarv við bráðneyðugum tørvi á verju* ella á *Umboðandi listan við mannaættarinnar siðaarvi* kann víðkast til aðrar felagsskapir, bólkar ella, um hóskandi , einstaklingar í tjóðarhøpi og/ella altjóðahøpi eftir umbøn frá limalondum í hvørs øki ella økjum fyribrigdið finst og eftir játtan frá viðkomandi felagsskapum, bólkum og, um hóskandi, einstaklingum.

17. At innskriva eitt fyribrigdi á *Listan fyri siðaarv við bráðneyðugum tørvi á verju* ella á *Umboðandi lista við mannaættarinnar siðaarvi* kann avmarkast í tjóðarhøpi og/ella altjóðahøpi, um limalond í hvørs øki ella økjum fyribrigdið finst biðja um tað, eftir játtan frá viðkomandi felagsskapum, bólkum og, um hóskandi, einstaklingum.

18. Limalandið/-londini, sum talan er um, sendir/senda eina nýggja tilnevning, sum vísir ta víðkaðu ella avmarkaðu tilnevningina, og sum lúkar øll krøv til innskriving. Ein slík tilnevning skal latast inn eftir teimum vanligu mannagongdunum og tíðarfreistum fyri tilnevning.

19. Um so er, at Nevndin ger av at innskriva fyribrigdið eftir tí nýggju tilnevningarfíluni, so kemur tann nýggja í staðin fyri ta upprunaligu innskrivingina. Um so er, at Nevndin ger av at ikki innskriva ta nýggju tilnevningarfíluna, skal tann upprunaliga innskrivingin standa við.

I.7 At lata umsókn inn

20. Oyðiblaðið ICH-01 skal brúkast til tilnevningar til *Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju*, ICH-02 til *Umboðandi lista við mannaættarinnar siðaarvi*, ICH-03 til uppskot um ætlanir, verkætlanir og virksemi, sum á bestan hátt endurspegla grundreglurnar og endamálið við sáttmálanum.

21. Limalond kunna biðja um hjálp til at fyrireika tilnevningarfílur til *Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju* og til tilevning av uppskotum um ætlanir, verkætlanir og virksemi, sum á bestan hátt endurspegla grundreglurnar og endamálið við sáttmálanum.

22. Viðvíkjandi fyrireikandi hjálp: oyðiblað ICH-05 verður brúkt til umbønir um fyrireikandi hjálp til at útfylla eina tilnevning til *Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju,* og oyðiblað ICH-06 verður brúkt til umbønir um fyrireikandi hjálp til tilevna eitt uppskot um eina ætlan, verkætlan ella virksemi til nevndina at velja og góðkenna. Allar aðrar umbønir um altjóða stuðul, hvør ið upphæddin so er, skula latast inn á oyðiblað ICH-04.

23. Øll oyðibløðini eru tøk á [https://ich.unesco.org](https://ich.unesco.org) ella kunna útvegast á Avgreiðslustovuni. Umsóknirnar skula bert lata upplýsingar, sum eru kravdir á oyðibløðunum.

24. Limalond, sum søkja, skula draga felagsskapir, bólkar og, har tað hóskar, viðkomandi einstaklingar inn í fyrireikingarnar av umsóknum.

25. Eitt limaland kann taka eina innsenda umsókn aftur til eina og hvørja tíð, áðrenn Nevndin hevur viðgjørt hana, og ikki missa rættin til at njóta gott av altjóða stuðli eftir Sáttmálanum.

I.8 At meta um umsóknir

26. Ummæli inniber meting av samsvari millum tilnevning, uppskot ella altjóða stuðulsumbøn og tær kravdu treytirnar.

27. Sum ein roynd skal tilnevningarmetingin til innskriving á *Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju* og á *Umboðandi lista við mannaættarinnar siðaarvi* av ætlanum, verkætlanum og virksemi í uppskoti, sum á bestan hátt endurspegla grundreglurnar og endamálið við sáttmálanum og av umsóknum um altjóða hjálp upp á  meira enn 100.000 amerikanska dollarar fullførast av einum ráðgevandi bólki í Nevndini, sum er stovnaður í tráð við grein 8.3 í sáttmálanum, sum hevur heitið "Metingarbólkur". Metingarbólkurin ger tilmæli til Nevndina um hennara avgerð. Í Metingarbólkinum skula vera tólv limir, sum Nevndin velur: seks serfrøðingar á ymiskum økjum í siðaarvi, umboðandi limalond, sum ikki eru limir í Nevndini og seks landsviðurkendir fólksligir felagsskapir, havandi atlit til rímiliga landafrøðiliga umboðan og ymisk øki í siðaarvi.

28. Limir í Metingarbólkinum kunna í mesta lagi sita fýra ár. Hvørt ár velur Nevndin ein fjórðing av limunum av nýggjum. Í minsta lagi tríggjar mánaðir áðrenn Nevndin kemur saman, skal Avgreiðslustovan boða limalondunum í hvørjum valøki frá, at nevndarsessur er tøkur at seta. Upp til trý valevni skal forfólkið í valbólkinum, sum talan er um, senda Avgreiðslustovuni í minsta lagi seks vikur áðrenn Nevndin kemur saman. Tá ið Nevndin hevur sett limirnar, skula teir arbeiða ópartískt og røkja áhugamálini hjá øllum limalondunum og sáttmálanum.

29. Til *Listan fyri siðaarv við bráðneyðugum tørvi á verju* skal hvørt ummæli umfata eina meting av lívføri fyribrigdsins, og um verjuætlanin er møgulig og nóg umfatandi. Tað skal eisini umfata meting av, hvussu stórur vandi er fyri, at tað hvørvur, vegna m.a. vantandi fígging til at tryggja og verja tað, ella vegna altjóðagerð og sosialar og umhvørvisligar broytingar.

30. Metingarbólkurin skal lata Nevndini eina metingarfrágreiðing við tilmæli viðvíkjandi:

- at innskriva ella ikki innskriva tilnevnda fyribrigdið á *Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju* ella á *Umboðandi listan við mannaættarinnar siðaarvi*, ella at vísa tilnevningini aftur til landið/londini, sum hevur/hava latið hana inn og biðja um fleiri upplýsingar.

- at velja ella ikki velja ætlanina, verkætlanina ella virksemi, sum er í uppskoti, ella at vísa uppskotinum aftur til limalandið/-londini, sum hevur/hava latið hana inn og biðja um fleiri upplýsingar.

- at játta ella ikki játta umsókn um altjóða stuðul, ella at vísa umsóknini aftur til limalandið/-londini, sum hevur/hava latið hana inn og biðja um fleiri upplýsingar.

31. Avgreiðslustovan skal senda Nevndini eitt yvirlit yvir allar tilnevningar, uppskot um ætlanir, verkætlanir og virksemi og umsóknir um altjóða stuðul, eisini samandráttir og metingarfrágreiðingar. Skjølini og metingarfrágreiðingarnar verða eisini tøkar hjá limalondunum at nýta í síni ráðførslu.

I.9 Tilnevningar til *Listan fyri siðaarvi við bráðneyðum tørvi á verju*, sum skula viðgerast við sera stórum skundi.

32. Tá ið sera stórur skundur ger seg galdandi, kann Nevndin, í samsvar við treyt U.6, bjóða limalandið/-londini at senda tilnevning til *Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju* á eini snarskrá. Nevndin skal, í samráð við tilnevnandi limalandið/-londini, kanna kanna tilnevningina so skjótt sum gjørligt eftir, at hon er komin, í samsvar við mannagongd, sum skal ásetast av Nevndarskrivstovuni í hvørjum føri sær. Mál, sum hava sera stóran skund, kunna limalandið/-londini, har fyribrigdið er staðsett, onnur limalond, tað áhugaða samfelagið ella ein ráðgevandi felagsskapur senda til Nevndarskrivstovuna. Limaland/-lond, sum hevur/hava við málið at gera, skula hava hóskandi kunning.

I.10 Nevndargjøgnumgongd av umsóknum

33. Nevndin avger tvey ár frammanundan, í samsvari við tøkt tilfeingi og arbeiðsevni, hvussu mangar umsóknir kunna verða viðgjørdar tey næstu tvey umførini. Loftið er galdandi fyri umsóknir, sum umfata tilnevningar til *Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju* og *Umboðandi listan við mannaættarinnar siðaarvi*, uppskot til ætlanir, verkætlanir og virksemi, sum á bestan hátt endurspegla meginreglur og endamál í

Sáttmálanum, og umbønir um altjóða stuðul størri enn 100.000 amerikanskar dollarar.

34. Nevndin skal stremba eftir at viðgera í minsta lagi eina umsókn fyri hvønn tilnevnandi land so gjølla sum til ber, innan fyri hetta loft, raðfestingin er soleiðis:

i umsóknir frá londum, sum hava einki fyribrigdi innskrivað, bestu verjugongdir valdar ella umbønir um altjóða stuðul størri enn 100.000 amerikanskar dollarar játtaðar og tilnevningar til *Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju;*

ii fleirtjóða umsóknir; og

iii umsóknir frá londum við fæst fyribrigdum innskrivaðum, bestu verjumannagongdir valdar ella umbønir um altjóða stuðul størri enn 100.000 amerikanskar dollarar játtaðar, samanborið við onnur tilnevnandi lond í sama umfari.

Um so er, at lond tilnevna fleiri umsóknir í sama umfari, skula tilnevnandi lond viðmerkja, við hvørjari raðfesting teir vilja hava umsóknirnar viðgjørdar og fáa í boði at raðfesta *Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju.*

35. Eftir viðgerðina skal Nevndin gera av:

um eitt fyribrigdi skal ella skal ikki verða innskrivað á *Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju* ella á *Umboðandi listan við mannaættarinnar siðaarvi*, ella tilnevningin skal beinast til tilnevnandi landið/londini viðvíkjandi meiri upplýsing;

um ein ætlan, verkætlan ella eitthvørt virksemi skal ella skal ikki veljast sum besta verjugongd, ella um uppskotið skal beinast til tilnevnandi landið/londini viðvíkjandi meiri upplýsing;

um altjóða stuðulsumbønir størri enn 100.000 amerikanskar dollarar skula ella skula ikki játtast, ella um uppskotið skal beinast til tilnevnandi landið/londini viðvíkjandi meiri upplýsing;

36. Tilnevningar, uppskot ella umbønir, sum Nevndin ger av ikki at innskriva, velja ella játta ella beina til tilnevnandi landið/londini viðvíkjandi meiri upplýsing, kunna sendast Nevndini aftur til viðgerð í øðrum komandi umfari, eftir dagføring og uppískoyti.

37. Ein avgerð hjá Nevndini at beina eina tilnevning, eitt uppskot ella eina umbøn til tilnevnandi landið/londini viðvíkjandi meiri upplýsing merkir ikki og er ikki trygd fyri, at fyribrigdið verður innskrivað, uppskotið valt ella umbønin játtað í framtíðini. Ein og hvør endurframløga skal til fulnar vísa, at treytirnar fyri innskriving, vali ella játtan eru fylgdar.

**I.11 At flyta eitt fyribrigdi av einum lista á hin ella taka eitt fyribrigdi av lista**

38. Eitt fyribrigdi kann ikki standa samstundis á *Listanum fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju* og á *Umboðandi listanum við mannaættarinnar siðaarvi*. Eitt limaland kann biðja um, at eitt fyribrigdi verður flutt av øðrum listanum á hin. Slík umbøn má vísa, at fyribrigdið uppfyllir allar treytir, sum eru til listan, sum søkt verður um at flyta til, og skal sendast inn í samsvar við fyriskrivaðar mannagongdir og umsóknarfreistir fyri tilnevningar.

39. Nevndin skal taka eitt fyribrigdi av *Listanum fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju,* tá ið hon ger av, eftir at hava mett um framd verjutiltøk, at fyribrigdið lýkur ikki longur eina ella fleiri treytir til at vera innskrivað á tann listan.

40. Nevndin skal taka eitt fyribrigdi av *Umboðandi listanum við mannaættarinnar siðaarvi ,* tá ið hon ger av, at tað lýkur ikki longur eina ella fleiri treytir til at vera innskrivað á tann listan.

I.12 At broyta navnið á einum innskrivaðum fyribrigdi

41. Eitt ella fleiri limalond kann/kunna biðja um, at navnið á einum innskrivaðum fyribrigdi verður broytt. Slík umbøn skal latast inn í minsta lagi tríggjar mánaðir undan nevndarsetuni.

I.13 Ætlanir, verkætlanir og virksemi, valdar/valt sum best endurspeglandi grundreglur og endamál í Sáttmálanum.

42. Nevndin skal eggja til gransking, skráseting, útgávu og útbreiðslu av góðum mannagongdum og fyrimyndum við altjóða samstarvi, sum skapar verjutiltøk og gagnligar umstøður til slík tiltøk, sum limalond hava ment, tá ið útvaldar ætlanir, verkætlanir og virksemi er sett í verk, við stuðli ella við ongum stuðli.

43. Nevndin skal eggja limalondunum til at skapa gagnligar umstøður til at seta slíkar, ætlanir, verkætlanir og slíkt virksemi í verk.

44. Umframt at skráseta valdar ætlanir og verkætlanir og valt virksemi skal Nevndin savna og gera tøkar upplýsingar um tiltøk og háttaløg nýtt og gjørdar royndir, um nakrar eru.

45. Nevndin skal eggja til gransking um og eftirmeting av, hvussu nógvan mun verjutiltøkini í ætlanum, verkætlanum og virksemi, sum hon hevur valt, gera og skal virka fyri altjóða samstarvi í slíkari gransking og eftirmeting.

46. Við støði í gjørdum royndum og lærdómi úr hesum og øðrum verjutiltøkum, verkætlanum og virksemi, skal Nevndin veita ráðgeving um bestu verjumannagongdir og gera tilmæli um tiltøk viðvíkjandi verju av siðaarvi (Grein 7(b) í Sáttmálanum).

I.14 Altjóðastuðul

47. Áheitanir um altjóðastuðul upp til 100.000 amerikanskar dollarar (undantiknar eru áheitanir um fyrireikingarstuðul) og neyðsynjaráheitanir uttan mun til upphædd kunna altíð latast inn.

46. Avgreiðslustovan skal vissa seg um, at áheitanin er fullkomin og kann biðja um vantandi upplýsingar. Hon skal upplýsa umsøkjandi limalandi/-londini um, nær áheitanin verður viðgjørd.

49. Áheitanir um upp til 100.000 amerikanskar dollarar, íroknað fyrireikingarstuðul, verða viðgjørdar og játtaðar av Nevndarskrivstovuni.

50. Neyðsynjaráheitanir uttan mun til upphædd verða viðgjørdar og játtaðar av Nevndarskrivstovuni. Við tí endamáli at gera av, um ein áheitan um altjóðastuðul myndar neyðsynjaráheitan, sum eigur at fáa raðfesta umhugsan á Nevndarskrivstovuni, er ein neyðsynjaráheitan veruleiki, tá ið eitt limaland ikki sjálvur fær klárað støður, sum standast av vanlukku, vápnaðum samanbrestum, álvarsligari sótt ella nakrari aðra náttúru- ella manngjørdari hending, sum hevur álvarsligar fylgjur fyri tann siðaarvin eins væl og felagsskapir, bólkar og – um tað hóskar – einstaklingar, sum eru berarar av tí arvi.

51. Áheitanir størri enn 100.000 amerikanskar dollarar verða mettar av Metingarbólkinum, lýstur í grein 27 omanfyri, og viðgjørdar og játtaðar av Nevndini.

52. Avgreiðslustovan skal boða umsøkjarum frá avgerð viðvíkjandi játtan av stuðli innan tvær vikur eftir avgerðina. Avgreiðslustovan skal semjast við umsøkjaran um staklutir í stuðlinum.

53. Stuðulin skal vera undir viðkomandi eftirliti, fráboðanarskyldu og eftirmeting.

I.15 Tíðartalva – yvirlit yvir mannagongdir

54. Fyrsta skeið: Fyrireiking og innlating

31.mars, ár 0 Freist til umbøn um fyrireikingarstuðul til at útgreina tilnevningar til *Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju* og uppskot til ætlanir, verkætlanir og virksemi, sum á bestan hátt endurspegla endamálini í Sáttmálanum (Grein 18).

31.mars, ár 1 Freistin, tá ið tilnevningar til *Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju* og á *Umboðandi lista við mannaættarinnar siðaarvi,* uppskot til ætlanir, verkætlanir og virksemi og áheitanir størri enn 100.000 amerikanskar dollarar skula vera Avgreiðslustovuni í hendi. Umsóknir, sum koma eftir henda dag, verða viðgjørdar í næsta umfari. Avgreiðslustovan leggur umsóknirnar út á heimasíðu Nevndarinnar so hvørt, á upprunamálinum.

30.juni, ár 1 Freist tá ið Avgreiðslustovan hevur viðgjørt umsóknirnar, her uppií skrásett og kvittað fyri móttøku. Um ein umsókn er óliðug, fær limalandið í boði at gera umsóknina lidna.

30.sept, ár 1 Freist tá ið limalandið skal lata kravdar vantandi upplýsingar inn, um nakrir eru, á Avgreiðslustovuna. Umsóknir, sum enn eru ólidnar, verða sendar aftur til limalondini, sum kunna gera tær lidnar til eitt annað umfar. So hvørt sum umsóknir koma til Avgreiðslustovuna, sum hon hevur kravt eftir fleiri upplýsingum, verða tær lagdar á internetið í staðin fyri upprunaligu umsóknina. Umsetingar til enskt ella franskt av umsóknunum verða eisini lagdar út, so hvørt tær eru tøkar.

55. Annað skeið: Meting

| | |
|---|---|
| Des. ár 1<br>til mai ár 2 | Metingarbólkurin metir um umsóknirnar. |
| apríl – juni, ár 2 | Fundur í Metingarbólkinum um endaliga meting. |
| Fýra vikur undan Nevndarsetu | Avgreiðslustovan sendir metingarfrágreiðingar til limirnar Nevndini og ger tær tøkar á netinum til ráðlegging. |

56. Triðja skeið: Viðgerð

| | |
|---|---|
| Nov. ár 2 | Nevndin viðger tilnevningarnar, uppskot og umbønir og tekur sínar avgerðir. |

I.16 At innseta fyribrigdi søgd at vera *Meistarverk í mannaættarinnar munnborna og óítøkiliga mentanararvi* á *Umboðandi listan við mannaættarinnar siðaarvi*.

57. Í samsvari við Grein 31.1 í Sáttmálanum, skal Nevndin automatiskt seta øll fyribrigdi, sum vóru lýst at vera *Meistarverk í mannaættarinnar munnborna og óítøkiliga mentanararvi* , áðrenn Sáttmálin kom í gildi, inn á listan, og sostatt fylgja núverandi nýtsluvegleiðingini hjá Aðalfundinum.

58. Hendan innsetan kann krevjast av øllum londum, sum hava á sínum øki eitt ella fleiri fyribrigdi, sum eru lýst at vera Meistaraverk, uttan mun til um teir eru sáttmálapartar. Viðvíkjandi londum, sum ikki eru sáttmálapartar, sum hava fyribrigdi, sum eru lýst at vera Meistaraverk á listanum: teir skula njóta øll rættindi og taka við skyldum, sum eru í Sáttmálanum, men bert í mun til fyribrigdi, sum finnast á teirra øki, treytað av at tey játta skrivliga, og við tí fyritreyt at rættindi og skyldur fylgjast og kunna ikki fáast ella latast hvør sær.

59. Øll lond, sum ikki eru sáttmálapartar og hava fyribrigdi á sínum øki, sum eru lýst at vera Meistaraverk, skula fáa fráboðan frá Aðalstjóranum um at taka við hesari nýtslureglugerð, sum krevur, at hesi fyribrigdi skula vera á jøvnum føti við fyribrigdi, sum verða innskrivað í framtíðini, í samsvari við grein 16.2 í Sáttmálanum og skula vera undir somu reglum viðvíkjandi eftirliti, skifti av einum lista á hin ella striking, í samsvari við mátar, sum eru lýstir í hesi nýtslureglugerð.

60. Við omanfyrinevndu fráboðan fáa lond, sum ikki eru sáttmálapartur, samstundis frá Aðalstjóranum við heimild frá Nevndini í boði týðiliga at geva, innan eitt ár, sítt skrivliga samtykki og góðtaka rættindi og átaka sær skyldur, sum eru í Sáttmálanum í samsvari við teir mátar, sum eru lýstir í grein 58 og 59 omanfyri.

61. Tann skrivliga fráboðanin við samtykki landsins, sum ikki er sáttmálapartur, skal stílast til Aðalstjóran, sum virkar sum vørslumaður Sáttmálans, og myndar innlating av viðkomandi fyribrigdum, sum eru lýst sum Meistarverk, eftir øllum reglum og skipanum Sáttmálans.

62. Um so er, at eitt land, sum ikki er sáttmálapartur, hevur noktað at lata skrivligt samtykki at góðtaka rættindi og taka við skyldum í Sáttmálanum innan eitt ár viðvíkjandi fyribrigdum á sínum øki og innskrivaðum á *Umboðandi listan við mannaættarinnar siðaarvi,* skal Nevndini vera loyvt at strika hesi fyribrigdi av listanum.

63. Um so er, at eitt land, sum ikki er sáttmálapartur, hevur ikki svarað upp á fráboðanina ella einki sigur um hennara endamál, ella um eingin týðilig tilsiping er til hennara endamál innan eitt ár, sær Nevndin tøgnina ella vantandi svar sum noktan, sum heimilar at nýta grein 62 omanfyri, um ikki umstøður, hann hevur ikki ræði á, forða honum í at boða samtykki ella noktan.

64. Í teimum førum, tá ið tað verður uppdagað at eitt fyribrigdi á listanum, sum er lýst at vera Meistaraverk, finst á økinum bæði hjá limalandi og landi, sum er ikki sáttmálapartur, skal tað hava ágóða av øllum reglum og skipanum Sáttmálans, og í tí liggur, at landið, sum ikki er sáttmálapartur, fær í boði frá Aðalstjóranum, sum Nevndin heimilar, at góðkenna skyldurnar, sum eru í Sáttmálanum. Um landið, sum er ikki sáttmálapartur, ikki gevur týðiligt játtandi svar, skal Nevndin hava rætt til at mæla til, at hon tekur ikki ráð fyri, sum kunna skaða viðkomandi fyribrigdi, lýst at vera Meistaraverk.

65. Nevndin skal boða Aðalfundinum frá tiltøkum, sum eru gjørd hesum viðvíkjandi í samsvari við mátar og reglugerðir fyriskrivaðar í hesari nýtsluvreglugerð.

## KAPITTUL II Mentanargrunnurin fyri siðaarv

### II.1 Leiðreglur um nýtslu av tilfeingi grunsins

66. Tilfeingi grunsins, sum verður umsitin sum ein serstøk konta í samsvari við grein 1.1 í fíggjarreglugerðini hjá honum, skal fyrst og fremst brúkast til at játta altjóðastuðul, sum lýst í kapitli V í Sáttmálanum.

67. Tilfeingið kann eisini brúkast til:

a) at styrkja tiltaksgrunnin, sum er nevndur í grein 6 í fíggjarreglugerðini;

b) at stuðla annað virksemi hjá Nevndini, sum lýst í grein 7 í Sáttmálanum, íroknað slíkt, sum hevur samband við uppskot, nevnd í grein 18 í Sáttmálanum;

c) útreiðslur í samband við nevndafundarluttøku hjá umboðum fyri menningarlond, sum eru limir í Nevndini, men bara hjá persónum, sum eru serfrøðingar í siðaarvi, og – um fíggjarætlanin loyvir – frá ferð til ferð, útreiðslur fyri luttøku hjá umboðum, sum eru serfrøðingar í siðaarvi, úr menningarlondum, sum eru sáttmálapartar, men ikki limir í Nevndini;

d) útreiðslur til ráðgevingartænastur, sum Nevndin hevur biðið um, frá ikki-stjórnarligum og almannagagnligum felagskapum, almennum ella privatum bólkum og privatpersónum;

e) útreiðslur hjá almennum ella privatum bólkum, eins væl og privatpersónum, serstakliga limum í felagsskapum og bólkum, sum Nevndin hevur boðið á fund, sum ráðgevar í serstøkum málum.

## II.2 Amboð til at vaksa um tilfeingi hjá grunninum fyri siðaarv

### II.2.1 Gávugevar

68. Nevndin er takksom fyri veitingar til Mentanargrunnin fyri siðaarv (“Grunnurin”) sum miða ímóti at styrkja møguleikarnar hjá Nevndini at fremja sítt virksemi.

69. Nevndin er takksom fyri slíkar veitingar frá Sameindu tjóðum og teirra serkønu umboðsstovum og ætlanum, serstakliga menningarætlan Sameindu tjóða, og frá øðrum altjóða felagsskapum. Nevndin heitir eisini á limalondini og aðrar statir at lata sjálvbodnan stuðul til Grunnin. Nevndin er eisini takksom fyri stuðul til Grunnin frá almennum og privatum bólkum og einstaklingum.

70. Nevndin eggjar til at stovnaðir verða tjóðar-, almennir og privatir grunnar ella felagsskapir, sum miða ímóti at fremja endamálini í Sáttmálanum og er takksom fyri teirra íkast til Mentanargrunnin fyri siðaarv.

71. Nevndin heitir á limalond at veita stuðul til altjóða innsavningarátøk, sum verða fyriskipað til fyrimun fyri Grunnin undir Vísinda- og mentanarstovni Sameindu tjóða (UNESCO) vernd.

### II.2.2 Treytir

72. Ongar politiskar, fíggjarligar ella aðrar umstøður, sum eru ósambæriligar við endamálini í Sáttmálanum kunna vera knýtt at stuðli, sum verður veittur Grunninum.

73. Eingin stuðul kann verða góðkendur frá eindum, hvørs virksemi er ikki sambæriligt við endamál og grundreglur í Sáttmálanum, við galdandi mannarættindakrøv, við krøv um burðardygga menning ella við neyðuga sínamillum virðing millum felagsskapir, bólkar og einstaklingar. Avgreiðslustovan kann taka avgerð um at leggja serstøk mál um gávur fyri Nevndina.

74. Sjálvbodnar gávur til *Mentanargrunnin fyri siðaarv* verða stýrdar í samsvari við Grunsins fíggjarreglur, *Leiðreglur um nýtslu av tilfeingi grunsins*, sum

Aðalfundurin hevur viðtikið, og tær ætlanir sum Nevndin fyrireikar regluliga, viðvíkjandi nýtslu av tilfeingi Grunsins. Serstakliga hesar ásetingar eru galdandi fyri sjálvbodnar gávur til Grunnin:

(a) Gávugevar hava onga beinleiðis ávirkan á, hvussu Nevndin vil brúka teirra stuðul til Grunnin.

(b) Eingin einstakur gávugevi fær persónliga frágreiðing ella fíggjarfrágreiðing.

(c) Semjur verða fingnar í lag við einum einstøkum brævaskifti millum Avgreiðslustovuna og gávugevan.

75. Upplýsing um mannagongdir at fylgja til at lata sjálvbodnan stuðul er tøk á **ich.unesco.org** ella við at skriva til **ich@unesco.org.**

II.2.3 Ágóði til stuðlar

76. Avgreiðslustovan skal hvørt ár boða Nevndini frá tí sjálvbodna stuðlinum, sum er veittur Grunninum. Nevndin skal hava gjøgnumskygni viðvíkjandi hesum stuðli, um gávugevar vilja tað. Sjálvbodnar gávur verða eisini kunngjørdar á heimasíðu Sáttmálans.

77. Viðurkenning til stuðulsveitarar skal verða givin soleiðis:

(a) Sjálvboðin ískoytisstuðul frá limalondum: Avgreiðslustovan almannakunnger ein dagførdan lista við limalondum í bókstavarað, sum hava latið Grunninum sjálvbodnan ískoytisstuðul, fyrst og fremst á heimasíðu Sáttmálans. Ein prentað útgáva verður givin út annaðhvørt ár, tá ið Aðalfundurin verður hildin.

(b) Stuðul frá øðrum londum, Sameindu tjóðum og teirra serkønu umboðsstovum og ætlanum, øðrum altjóða felagskapum og almennum felagsskapum: Avgreiðslustovan almannakunnger ein dagførdan lista í bókstavarað við londum, sum ikki eru sáttmálapartar, Sameindu tjóðum og teirra serkønu umboðsstovum og ætlanum, øðrum altjóða felagskapum og almennum felagsskapum, sum hava latið Grunninum sjálvbodnan ískoytisstuðul, fyrst og fremst á heimasíðu Sáttmálans. Ein prentað útgáva verður givin út annaðhvørt ár, tá ið Aðalfundurin verður hildin.

(c) Stuðul frá privatum felagsskapum og einstaklingum: Avgreiðslustovan almannakunnger ein dagførdan lista í raðfylgju við minkandi stuðulsupphæddum frá privatum felagsskapum og einstaklingum, sum hava latið Grunninum stuðul, fyrst og fremst á heimasíðu Sáttmálans. Ein prentað útgáva verður givin út annaðhvørt ár, tá ið Aðalfundurin verður

hildin. Í 24 tímar eftir stuðulsveitingina, kunna gávugevar lýsa við sínum samstarvi við Nevndina í øllum miðlum, íroknað faldarum og aðrari útgávu. Tilfarið skal rættlesast og góðkennast av Avgreiðslustovuni frammanundan og kann ikki bart út lýsa við gávugevarans vørum ella tænastum.

78. Limalond verða eggjaði til at umhugsa møguleikan at góðkenna privata stuðulsveiting til Grunnin til at fáa fíggjarligan fyrimun, sum kundi eggjað til slíka sjálvbodnar gávur, t.d. skattalætta ella onnur politisk amboð, sum eru í landsins lógum.

## KAPITTUL III At taka lut í íverksetan av Sáttmálanum

### III.1 Luttøka av felagsskapum, bólkum og, har tað hóskar, einstaklingum, eins væl og serfrøðingum, serfrøðistovnum og granskingarstovnum

79. Vísandi til grein 11 (b) í Sáttmálanum og í anda Sáttmálsgreinar 15 eggjar Nevndin limalondum til at fáa í lag virkisført og sínamillum munagott samstarv millum felagsskapir, bólkar og, har tað hóskar, einstaklingar eins væl og serfrøðingar, serfrøðistovnar og granskingarstovnar.

80. Limalond verða eggjaðir til at stovna ein ráðgevandi ella samskipandi stovn til at lætta um hjá felagsskapum, bólkum og, har tað hóskar, einstaklingum, eins væl og serfrøðingum, serfrøðistovnum og granskingarstovnum at taka lut í:

(a) at eyðmerkja og allýsa ymisk fyribrigdi av siðaarv, sum finnast í teirra øki;

(b) at gera skráir;

(c) at evna til og seta í verk ætlanir, verkætlanir og virksemi;

(d) at fyrireika tilnevningarumsóknir til Listan, í samsvari við viðkomandi greinir í Kapitli 1 í hesari nýtslureglugerð;

(e) at taka eitt eitt siðaarv fyribrigdi av øðrum Listanum ella skifta tað yvir á hin, sum lýst í greinunum 38-40 í hesari nýtsluvegleiðing.

81. Limalond skula gera neyðug tiltøk til at økja tilvitið hjá felagsskapum, bólkum og, har tað hóskar, einstaklingum um týdningin og virðið í teirra siðaarvi og í Sáttmálanum, so at berarar av hesum siðaarvi kunna fáa fulla nyttu av hesum amboð, sum ásetur støði.

82. Í samsvari við treytirnar í grein 11-15 í Sáttmálanum, skula limalond átaka sær hóskandi tiltøk til at førleikamenna felagsskapir, bólkar og, har tað hóskar, einstaklingar.

83. Limalond verða eggjaðir til at savna og regluliga dagføra, eftir sínum egna førimuni, eitt lið av serfrøðingum, serfrøðistovnum, granskingarstovnum og økisdeplum, sum virka á økjum, sum Sáttmálin umfatar, og sum kunna átaka sær tær kanningar, sum eru nevndar í grein 13 (c) í Sáttmálanum.

84. Millum teir privatu og almennu partar, nevndir í grein 85 í hesari nýtslureglugerð, kann Nevndin draga inn serfrøðingar, serfrøðistovnar og granskingarstovnar og eisini økisdeplar, sum virka á økjum, sum Sáttmálin umfatar, til at ráðføra seg við viðvíkjandi serstøkum málum.

85. Limalond skula royna at hjálpa felagsskapum, bólkum og, har tað hóskar, einstaklingum at fáa atgongd til granskingarúrslit, sum eru rokkin teirra millum og eisini fremja virðing fyri mannagongdum viðvíkjandi atgongd til ávísar partar av siðaarvi í samsvari við grein 13 (d) í Sáttmálanum.

86. Limalond verða eggjaði til saman, í økjum og undirøkjum, at menna netverk millum feløg, serfrøðingar, serfrøðingadeplar og granskingarstovnar, sum kunna fáa í lag felagsátøk, serstakliga viðvíkjandi pørtum av siðaarvi, sum eru felags, eins væl og tvørfaklig átøk.

87. Limalond, sum eiga heimildir viðvíkjandi einum siðaarvfyribrigdi, sum finst í økinum hjá øðrum landið, verða eggjaðir til at deila slíkar heimildir við ta landi, sum skal lata felagsskapum, bólkum og – har tað hóskar – viðkomandi einstaklingum, slíkar upplýsingar, eins væl og serfrøðingum, serfrøðingadeplum og granskingarstovnum.

88. Limalond verða eggjaði til at taka lut í virksemi, sum hevur við økissamstarv at gera , eisini tí virksemi, sum er í bólki 2 miðstøðum fyri siðaarv, sum eru ella verða stovnaðar undir UNESCOsa vernd, til at gerast førir fyri at samstarva so væl sum gjørligt, í samsvar við grein 19 í Sáttmálanum, við luttøku av felagsskapum, bólkum og - har tað hóskar - viðkomandi einstaklingum, eins væl og serfrøðingum, serfrøðingadeplum og granskingarstovnum.

89. Nevndin kann, innan fyri givnar fíggjarkarmar, bjóða einum og hvørjum almennum ella privatum bólki (íroknað serfrøðingardeplum og granskingarstovnum), eins væl og privatfólki við viðurkendum førleika í siðaarvi (íroknað felagsskapum, bólkum, og øðrum serfrøðingum) at taka lut í nevndarfundum til tess at styrkja eina tvívegis samrøðu og fáa góð ráð frá teimum um ymisk serøki, í samsvari við grein 8.4 í Sáttmálanum.

## III.2 Ikki-stjórnarligir felagsskapir og Sáttmálin

### III.2.1 Ikki-stjórnarligir felagsskapir taka lut á landsstøði

90. Í samsvari við grein 11(b) í Sáttmálanum skula limalond taka viðkomandi ikki-stjórnarligar felagsskapir við, tá ið Sáttmálin skal setast í verk, *inter alia* til eyðmerking og allýsing av siðaarvi og aðrar hóskandi verjuatgerðir, í samarbeiði og samskipan við aðrar partar, sum hava við íverksetanina av Sáttmálanum at gera.

### III.2.2 Viðurkendir ikki-stjórnarligir felagsskapir taka lut

*Treytir fyri at góðkenna ikki-stjórnarligar felagsskapir*

91. Ikki-stjórnarligir felagsskapir skula:

(a) hava staðfestar førleikar, serkunnleika og royndir í at verja (sum lýst í grein 2.3 í Sáttmálanum) siðaarv á m.a. einum ella fleiri økjum;

(b) hava viðkomandi staðbundnan, tjóðarligan, økis ella altjóða samleika;

(c) hava endamál, sum er í samsvar við Sáttmálans anda og felagslógir ella samtyktir, sum samsvara við tey endamál;

(d) samstarva við sínamillum virðing við felagsskapir, bólkar og – har tað hóskar – einstaklingar, sum skapa, fremja og føra siðarvin víðari;

(e) hava førleika at fremja virksemi, sum inniber t.d.:

> Ein virknan limaskara, sum myndar ein felagsskap, sum ynskir at fremja endamálini, sum felagsskapurin er stovnaður til;
>
> Eitt ávíst heimstað, og at vera góðkendur løgfrøðiligur persónur í tráð við landsins lógir.

At hava verið til og framt viðkomandi virki í í minsta lagi fýra ár, tá ið góðkenning verður umhugsað.

*Mátar og meting av góðkenning*

92. Nevndin biður Avgreiðslustovuna taka ímóti umbønum frá ikki-stjórnarligum felagsskapum og lata henni viðmæli við atliti til góðkenning og við atliti til at varðveita ella enda sambandið við teir.

93. Nevndin sendir síni viðmæli til Aðalfundin at taka avgerð, í samsvari við grein 9 í Sáttmálanum. Tá ið nevndin fær slíkar umbønir, skal hon taka atlit til meginregluna um javna landafrøðiliga umboðan byggjandi á upplýsingar, sum avgreiðslustovan útvegar henni. Góðkendir ikki-stjórnarligir felagsskapir skula halda viðkomandi lógir heima og altjóða og etiskt støði.

94. Nevndin eftirmetir íkastið og arbeiðssemið hjá ráðgevandi felagsskapinum og sítt samband við hann fjórða hvørt ár eftir góðkenning, havandi í huga sjónarmiðini hjá ikki-stjórnarliga felagsskapinum, sum talan er um.

95. Sambandið kann verða slitið, tá ið eftirmetingin fer fram, um Nevndin heldur tað vera neyðugt. Um umstøðurnar krevja tað, kann sambandið við viðkomandi felagsskap verða fyribils endað, til avgerð er tikin viðvíkjandi at slíta sambandið.

*Ráðgevandi virksemi*

96. Góðkendir ikki-stjórnarligir felagsskapir, sum – sambært grein 9.1 í Sáttmálanum – skula hava ráðgevandi leiklut í Nevndini, kunna verða bidnir at útvega Nevndini m.a. frágreiðingar um eftirmeting, so at Nevndin tann vegin fær kannað:

(a) tilnevningar til *listan fyri siðaarvi sum hevur bráðneyðugan tørv á verju*;

(b) ætlanir, verkætlanir og virksemi, nevnt í grein 18 í Sáttmálanum;

(c) umbønir um altjóða stuðul;

(d) úrslit av verjuætlanum fyri fyribrigdi á listanum fyri siðaarvi sum hevur bráðneyðugan tørv á verju.

*Mannagongd fyri góðkenning*

97. Ein ikki-stjórnarligur felagsskapur, sum søkir um góðkenning sum ráðgevari hjá Nevndini, skal lata Avgreiðslustovuni, hesar nevndu upplýsingar:

(a) lýsing av felagsskapinum, íroknað fult alment navn;

(b) sítt høvuðsendamál;

(c) sín bústað;

(d) stovningardag, ella umleið hvussu leingi hann hevur verið til;

(e) navnið á landi ella londum, har hann er virkin;

(f) skjalprógv, sum vísir at hann er førur fyri at virka, íroknað prógv um:

i. ein fastan, virknan limaskara, sum hevur felagstrá at arbeiða fyri endamálunum, sum vóru ásett við stovnan;

ii. ein ávísan bústað, og er góðkendur løgfrøðiligur persónur eftir landsins lógum;

iii. at hann hevur verið til og tikið lut í hóskandi virksemi í í minsta lagi 4 ár innan góðkenningartilgongdina.

(g) sítt virksemi á økinum við verju av siðaarvi;

(h) lýsing av sínum royndum við at samstarva við felagsskapir, bólkar og tey, sum starvast við siðaarv.

98. Umsóknir um góðkenning skula skrivast á oyðiblaðið ICH-09 (fæst á https://ich.unesco.org ella við at venda sær til Avgreiðslustovuna), sum skal innihalda allar kravdar upplýsingar og bara teir. Umsóknir skula vera Avgreiðslustovuni í hendi innan 30. april í stakári til viðgerð í Nevndini á regluligum fundi tað sama árið.

99. Avgreiðslustovan skal skráseta umbønirnar og dagføra listan við ikki-stjórnarligum felagsskapum, sum eru góðkendir av Nevndini.

## KAPITTUL IV AT VEKJA VITSKU UM SIÐAARV OG UM AT BRÚKA BÚMERKI SÁTTMÁLANS TIL AT VERJA SIÐAARV

### IV.1 At vekja vitsku um siðaarv

#### IV.1.1 Almennar ásetingar

100. Fyri at Sáttmálin skal fáast at virka væl, skula limalond royna av øllum alvi at vissa sær, at virðing er fyri siðaarvi í samfelagnum, bólkum og hjá viðkomandi einstaklingum, og eisini vekja vitsku á staðnum, í tjóðini og altjóða um, hvussu stóran týdning siðaarvur hevur og verja sær, at virðismetingin av honum gongur báðar vegir.

101. Tá ið vit vekja vitsku um týdningin av ávísum fyribrigdum í siðaarvi, verður heitt á allar partar um at fylgja hesum grundreglum:

(a) Viðkomandi siðaarvur hóskar til allýsingina í grein 2.1 í Sáttmálanum;

(b) Viðkomandi felagsskapir, bólkar og – har tað hóskar – einstaklingar hava givið fría, upplýsta játtan frammanundan at vekja vitsku um sín siðaarv, og vissa er fyri at tey taka lut í so stóran mun sum gjørligt í vitskuvekjandi tiltøkunum;

(c) Vitskuvekjandi hendingarnar virða fult út mannagongdir, sum eru siðvenja, og sum stýra atgongd til serstakar partar av slíkum arvi, serstakliga loynilig og heilag fyribrigdi;

(d) Felagsskapir, bólkar og - har tað er hóskandi – einstaklingar skula hava fyrimun av teimum tiltøkum, sum verða sett í verk til tess at vekja vitsku um teirra siðaarv.

102. Allir partar verða eggjaðir til at ansa serliga væl eftir, at vitskuvekjandi atgerðir skula ikki:

(a) taka siðaarvsins sýningar og framløgur burtur úr sínum samanhangi ella skúgva teirra heimarætt til viks;

(b) marka felagsskapir, bólkar ella viðkomandi einstaklingar sum verandi uttan fyri samtíðarlív ella á nakran hátt skaða teirra persón.

(c) rættvísgera nakran politiskan, sosialan, etniskan, religiøsan, málsligan ella kynsligan mannamun;

(d) vera uppií misnýtslu av ella skemdarorðum um vitan og førleikar hjá viðkomandi felagsskapum, bólkum og einstaklingum;

(e) lokka til yvirdrivið vinnuligt virksemi ella óburðardygga ferðavinnu, sum kann seta siðaarvin í váða.

VI.1.2 Staðarstøði og landsstøði

103. Limalond verða eggjaði til at menna og nýta siðfrøðiligar reglur, sum byggja á ásetingarnar í Sáttmálanum og hesa nýtslureglugerð, fyri at vissa sær hóskandi háttalag í vitskuveking um siðaarv, sum finst í økinum hjá hvørjum sær.

104. Limalond skula royna at tryggja sær, serstakliga við at brúka ognarrættindi til andliga ogn, privatan ognarrætt ella aðra lógarvernd, at rættindi hjá felagsskapum, bólkum og einstaklingum, sum skapa, bera og lata eftirkomarum sín siðaarv eru lógliga vard, tá ið vitskuveking um teirra siðaarv er á skránni ella handilsligt virksemi.

105. Limalond skula royna av øllum alvi at upplýsa almenningin um týdningin, siðaarvur hevur og um vandar, sum hótta hann, eins og um tað virksemi, sum verður gjørt fyri at fylgja Sáttmálanum. Til at gera hetta verða limalond eggjaði til:

(a) at stuðla miðlaátøkum og útvarpan av siðaarvi í øllum miðlum;

(b) at stuðla uppundir, at ráðstevnur, arbeiðsfundir, almennir fundir og skeið verða skipað um siðaarv, eins og framsýningar, festivalar, mentanardagar og kappingar um siðaarv;

(c) at stuðla stakkanningum og kanningum á staðnum og stuðla útbreiðslu av hesum upplýsingum;

(d) at fremja politikkir og virka fyri at tað almenna viðurkennir tey, sum bera og útinna siðaarvin;

(e) at virka fyri og stuðla uppundir at samfelagsstovnar verða stovnað og upplýsingar verða lutaðir teirra millum;

(f) at menna manngongdir, sum viðurkenna tað íkast, sum sýningar av siðaarvi umboðaður í í teirra økjum, lata til mentanarligt margfeldi og ríkidømi í londunum;

(g) at styðja menning og fremjing av staðbundnum mannagongdum, sum eru ætlaðar at virka fyri tilvitsku um siðaarv.

106. Limalond skula serstakliga leggja sær nær at taka við tiltøkum, sum miðja ímóti at fremja og upplýsa um ætlanir, verkætlanir og virksemi, sum er valt av Nevndini, í samsvar við grein 18 í Sáttmálanum, tí at tey best endurspegla grundreglur og endamál í Sáttmálanum.

*Formlig og ikki-formlig undirvísingartiltøk*

107. Limalond skula leggja sær nær at veita vissu fyri viðurkenning av, virðing fyri og styrking av siðaarvi við útbúgvingar- og upplýsingartiltøkum, eins væl og førleikamennandi virksemi og ikki-formligum mátum at lata kunnleika til næsta ættarlið (grein 14 (a) í Sáttmálanum). Limalond verða serstakliga rádd til at fremja tiltøk og ætlanir sum miða ímóti at:

(a) lata siðaarv fáa sess sum eitt amboð til integratión og millummentanarliga samrøðu, fremja fleirmálsliga undirvísing, sum umfatar heimamál;

(b) hava undirvísing í siðaarvi á staðarbundnari tímatalvu og menna hóskandi tilfar til undirvísing og venjing, eitt nú bøkur, fløgur, sjónbond, dokumentarfilmar, vegleiðingar ella faldarar;

(c) styrkja læraranna førleika at undirvísa í siðaarvi og menna frágreiðingar og vegleiðingar til tað;

(d) fáa samstarv við foreldur og foreldrafeløg, sum kunna koma við uppskotum um temu og tilgongdir í skúlaundirvísing siðaarvi;

(e) fáa samstarv við tey sum, røkja og varðveita arvin til at menna undirvísingarætlanir og bjóða teimum at greiða frá sínum arvi í skúlum og undirvísingarstovnum;

(f) Fáa samstarv við ungdóm til at savna og breiða út upplýsing um siðaarv í teirra samfelag;

(g) viðurkenna virðið í at – óformliga - lata næsta ættarliði vitan og førleikar, sum eru groyptir innan í siðaarvi;

(h) leggja dent á uppliving við siðaarvi  við venjingum, sum umfata undirvísingarhátt, har øll taka lut, sum til dømis spøl, heimalæru og lærlingalæru;

(i) menna virksemi sum summarvenjing, opið hús, vitjanir, foto- og videokappingar, mentanarnámsferðir, ella skúlaútferðir til náttúrustøð og minnispláss, sum hoyra til lýsing av siðaarvi;

(j) at nýta til fulnar , har tað er hóskandi, upplýsingar- og samskiftistøkni;

(k) at undirvísa í siðaarvi á universitetum og styðja uppundir menning av tvørfakligum, vísindaligum, tøkniligum og listarligum lærugreinum, eins og granskingarháttaløgum;

(l) at útvega yrkisleiðbeining til ungdóm við at kunna tey um virðið í siðaarvi fyri persónliga og arbeiðsliga menning;

(m) at venja felagsskapir, bólkar ella einstaklingar í at fyrisita smáar fyritøkur, sum fáast við siðaarv;

*Bygdarhús og feløg, søvn, skjalasøvn og aðrir tílíkir stovnar*

108. Bygdarhús og feløg, sum eru stovnað og fyrisitin av samfeløgum sjálvum kunna spæla stóran leiklut við at  styðja uppundir arvaskiftið við siðaarvi og við at upplýsa almenningin um hansara týdning fyri tey samfeløgini. Til tess at vera við til at veita vitan um siðaarv og hansara týdning, verða tey eggjað til :

(a) at lata seg brúka av fólkinum sum mentanarhús, har teirra siðaarvur verður vardur á ikki-formligan hátt;

(b) at geva pláss til, at siðbundin vitan og førleiki verður latin í arv og á tann hátt geva sítt íkast til samrøðu millum ættarlið;

(c) at virka sum upplýsingardeplar viðvíðkjandi siðaarvi í eini bygd/einum býi ella øki.

109. Granskingarstovnar, serfrøðingadeplar, søvn, skjalasøvn, bókasøvn, heimildadeplar og tílikir stovnar, spæla ein týdningarmiklan leiklut í at savna, skjalprógva, skráseta og varðveita upplýsingar um siðaarv, eins og at útvega upplýsing og vekja vitsku um hansara týdning. Til tess at styrkja sítt vitskuvekjandi virksemi um siðaarv verða hesir stovnar eggjaðir til:

(a) at fáa tey, sum útinna og bera siðaarvinum, uppí, tá ið framsýningar, fyrilestrar, ráðstevnur, orðaskifti verða fyriskipað um teirra arv;

(b) at taka í nýtslu og menna tilgongdir, so at fólk taka lut, tá ið siðaarvur verður vístur sum livandi arvur í støðugari broyting;

(c) at savna seg um støðuga endurskapan og framflyting av vitan og førleikum, sum eru neyðugir til at verja siðaarv, heldur enn lutirnar, sum verða settir í samband við hann;

(d) at brúka, tá ið tað hóskar, upplýsingar- og samskiftistøkni til at samskifta um merking og virði í siðaarvi;

(e) at fáa tey, sum liva í og varðveita arvin, upp í leiðsluna við at seta í verk luttøkuskipanir í menningarætlan á staðnum.

*Samskifti og miðlar*

110. Miðlarnir kunna í stóran mun vera við til at vekja vitsku um, hvussu týdningarmikil siðaarvur er.

111. Miðlarnir verða eggjaðir til at vera við til at vekja vitsku um, hvussu týdningarmikil siðaarvur er til at skapa sosialan samanhang, burðardygga menning og at fyribyrgja ósemjur, heldur enn bara at leggja dent á hansara fagurfrøðiliga ella undirhaldsliga virði.

112. Miðlarnir verða eggjaðir til at vekja vitsku í almenningi sum heild um fjølbroytni í lýsingum og framførslum av siðaarvi, serstakliga við at framleiða sersendingar og vørur, sum venda sær til ymiskar málbólkar.

113. Hoyri- og sjónmiðlar verða eggjaðir til at skapa dygdar útvarps- og sjónvarpssendingar og dokumentarsendingar, fyri at gera siðaarv sjónligari og styrkja støðu hansara í nútíðarsamfeløgum. Útvarpsstøðir á staðnum og felagsradiostøðir kundu hjálpt væl til við at styrkja heimamál og mentan, eins og við at boða upplýsing um góð verjuátøk.

114. Miðlarnir verða eggjaðir til at vera við til at breiða upplýsing út í samfelagnum við at brúka síni verandi netverk, til at styðja tey í teirra verjuroyndum ella við at stovna kjakpallar á staðar- ella tjóðarstøði.

115. Kunningartøknistovnar verða eggjaðir til at lætta um samvirkandi útbreiðslu av upplýsing og til at stuðla ikki-formliga skiftinum millum menniskju av siðaarvi, serstakliga við at menna samvirkandi forrit og spøl til ung.

*Handilsligt virksemi, sum viðvíkur siðaarvi*

116. Handilsligt virksemi, sum kann standast av summum sløgum av siðaarvi og keyp og søla av mentanarvørum og -tænastum, sum eru tengd at siðaarvi, kunna vekja vitsku um týdningin av slíkum arvi og skapa inntøkur til íðkararnar. Hetta kann vera við til at bøta liviumstøður í samfeløgum, sum bera og íðka arvin, stuðla fíggjarviðurskiftum á staðnum og økja sosialan samanhang. Men hetta virksemi og handilin skal ikki hótta lívføri hjá siðaarvi, og øll hóskandi atlit skula takast,

so at tað eru fyrst og fremst samfeløgini sjálvi, sum fáa ágóðan. Serstakliga skal ansast eftir, hvussu slíkt virksemi kann ávirka náttúruna og lívførið hjá siðaarvi, serstakliga tann partin av siðaarvi, sum er skiftissiðir, sosiala siðvenju ella náttúruvitan og vitan um alheimin.

117. Serstakliga skal ein skýggja fíggjarsvik, fyrisita ferðafólkavinnu á burðardyggan hátt, finna javnvág millum handilslig áhugamál, almenna fyrisiting og tey sum nýta og útinna mentanina og tryggja sær, at handilsligt virki ikki avlagar merking og endamál siðaarvsins í samfelagnum, tað snýr seg um.

IV.1.3 Altjóðastøði

118. Nevndin dagførir og gevur árliga út *Listan fyri siðaarv við bráðneyðugum tørvi á verju*, *Umboðandi listan við siðaarvi* og *Skráseting av ætlanum, verkætlanum og virksemi*, sum á besta hátt endurspegla grundreglurnar og endamálini í Sáttmálanum. Til tess at gera siðaarv sjónligari og vekja vitsku um hansara týdning á staðarstøði, tjóðarstøði og altjóðastøði eggjar nevndin til og stuðlar uppundir, at Listin verður útbreiddur so víða sum gjørligt, bæði á formligan og óformligan hátt, serstakliga gjøgnum:

(a) skúlar, eisini teir sum hoyra til UNESCO skúlanetverkið;

(b) kommunudeplar, søvn, skjalasøvn, bókasøvn og tílíkar stovnar;

(c) universitet, serføðingadeplar og granskingarstovnar;

(d) allar miðlar, eisini heimasíðuna hjá UNESCO.

119. Nevndin stuðlar framleiðslu av audiovisuellum og talgildum tilfari, eins væl og útgivnum verkum og øðrum lýsingartilfari sum til dømis kortum, frímerkjum, plakatum ella klistrimerkjum viðvíkjandi siðaarvi og teimum fyribrigdum, sum eru á Listunum.

120. Tá ið upplýsingar um fyribrigdini á Listunum verða almannakunngjørdir og útbreiddir, skal ansast eftir , at fyribrigdini verða lýst í sínum samanhangi og dentur verður lagdur á virði og merking teirra í viðkomandi samfelag, heldur enn bara á fagurfrøðiligan týdning og týdning sum undirhald.

121. Nevndin skal fylgja við í ætlanum, verkætlanum og virksemi, sum hon heldur umboða á bestan hátt grundreglur og endamál í Sáttmálanum og kunngera bestu mannagongdir á ymsan hátt, eisini við at brúka miðlarnar nevndir í grein 118 omanfyri í hesari nýtslureglugerð.

122. Til at hjálpa til við at gera siðaarv so sjónligan sum møguligt og vekja vitsku um hann, kann búmerki Sáttmálans brúkast í samsvar við grundreglur og ásetingar um hetta, sum kunngjørt í greinunum 126-150 í hesari nýtslureglugerð.

123. Til at hjálpa Nevndini at vekja vitsku um siðaarv, skal UNESCO avgreiðslustovan:

(a) virka sum avrokningarskrivstova í savning, umskifti og útbreiðslu av upplýsing um siðaarv, serstakliga við at halda og dagføra dátugrunnar, hava upplýsingartænastu og eina heimasíðu;

(b) lætta um umbýti av upplýsingum millum felagsskapir og bólkar, borgaraliga samfelagið, ikki-stjórnarligar felagsskapir, serfrøðingadeplar, granskingarstovnar og aðrar stovnar við servitan ella áhuga fyri siðaarvi;

(c) skipa fyri venjingar- og upplýsingartilfari til ymsar málbólkar sum stuðul til verju- og vitskuvekjandi átøk; slíkt tilfar skal vera lætt at margfaldað og týða á staðnum;

(d) skipa fyri og taka lut í verkstovum, námskeiðum og altjóðaráðstevnum til tess at veita upplýsing um Sáttmálan;

(e) samskipa arbeiði at vekja vitsku um siðaarvsins týdning við avgreiðslustovur hjá øðrum UNESCO amboðum og skráum, eins og øðrum ST umboðum og øðrum millumstjórnaligum felagsskapum;

(f) tala fyri , at siðaarvur er týdningarmikil í altjóða hátíðarhøldum, sum til dømis altjóða móðurmálsdegi ella heimsins degi fyri mentanarfjølbroytni í samrøðu og menning og byrja altjóða átøk til tess at vekja vitsku um siðaarv og til at økja sjálvboðið íkast til *Grunnin fyri siðaarv.*

(g) lata UNESCO lestrarstuðul og lærlingaskipan fevna um siðaarv.

## IV.2 At nýta búmerkið fyri millumtjóðasáttmálan til at verja siðaarv

### IV.2.1 Allýsing

124. Merki ella búmerki Sáttmálans, sum verður brúkt sum formligt stempul verður víst niðanfyri:

125. Búmerki Sáttmálans skal fylgjast við UNESCO búmerkinum, og kann ikki nýtast einsamalt, ásannandi at hvørt teirra hevur sína egnu reglugerð, og at nýtslan skal altíð vera góðkend í samsvari við hesar reglugerðir, ávikavist.

IV.2.2 Reglur galdandi fyri at nýta ávikavist búmerkið hjá UNESCO og búmerkið hjá Sáttmálanum.

126. Ásetingarnar í hesi leiðbeining eru bert galdandi fyri at nýta Sáttmálabúmerkið

127. At brúka UNESCO búmerkið, sum fylgir sáttmálabúmerkinum, verður skipað av leiðbeiningini um at brúka navnið, stuttnevni, búmerki og internetøkisnøvn hjá UNESCO, sum hetta er viðtikið á UNESCO Aðalfundi.[1]

128. At brúka sáttmálabúmerkið saman við UNESCO búmerkinum, skal tískil góðkennast eftir hesi reglugerð (fyri sáttmálabúmerkis viðkomandi) og eftir reglugerðini um at brúka navnið, stuttnevni, búmerki og internetøkisnøvn hjá UNESCO (fyri UNESCO búmerkis viðkomandi) í samsvar við tær mannagongdir, sum eru ásettar fyri hvørja av hesum reglugerðum.

IV.2.3 Nýtslurættindi

129. Bara lógarásettar sáttmálanevndir og -ráð, t.d. Aðalfundurin og Nevndin, eins og Avgreiðslustovan, hava rætt til at brúka sáttmálans búmerki uttan at fáa loyvi frammanundan, eftir reglunum í hesum reglugerðum.

IV.2.4 Heimild

130. Lógarásettar sáttmálanevndir og -ráð, t.d. Aðalfundurin og Nevndin, hava heimild at lata nýtsluloyvi. Í serligum føri, sum ásett í hesi reglugerð, kunna lógarásettir partar lata aðalstjóranum loyvi at lata øðrum pørtum nýtsluheimild. Slíkt loyvi til at lata heimild at brúka búmerkið hjá Sáttmálanum kann ikki latast øðrum pørtum.

131. Aðalfundurin og Nevndin geva loyvi til at nýta sáttmálabúmerkið við samtyktum og avgerðum, eina mest tá ið talan er um virksemi hjá almennum samstarvsfeløgum, altjóða- ella økisvirðislønir og serstakar hendingar hjá limalondum. Aðalfundurin og Nevndin kunna loyva UNESCO tjóðarnevndunum ella øðrum tilnevndum myndugleika - eftir umbøn frá viðkomandi limalandi - at nýta búmerkið og taka sær av spurningum viðvíkjandi nýtslu av búmerkinum á tjóðarstøði.

132. Lógarásettar nevndir og ráð í Sáttmálanum skula verja, at teirra samtyktir og avgerðir áseta treytirnar fyri givið loyvi, í samsvar við hesa reglugerð.

133. Aðalstjórin hevur myndugleika til at loyva nýtslu av sáttmálabúmerkinum í samband við verju og sáttmálabundin tiltøk og samstarv, eins væl og ávís lýsingartiltøk.

---

[1] Tann nýggjasta útgávan av leiðbeiningini um navn, stuttnevni,búmerki og internetøkisnøvn hjá UNESCO er at finna í uppískoytinum til samtykt 86 í 34. Aðalfundarsetu (34C/Samtykt 86) ella á http://unesdoc.unesco.org/images/0015/001560/1560e.pdf.

134. Ein og hvør avgerð, sum gevur loyvi til at nýta sáttmálabúmerkið skal hava støði í hesum fortreytum: (i) týdningur uppskotsins fyri og hugasamband við ætlanir og endamál Sáttmálans og (ii) samsvar við grundreglur Sáttmálans.

135. Lógarásettar nevndir og ráð kunna heita á Aðalstjóran at leggja ávís mál um loyvir fyri tey og/ella lata teimum frágreiðing av og á ella regluliga um ávís mál viðvíkjandi nýtslu og/ella loyvi, serstakliga viðvíkjandi heimild til verju-, samstarvs- og handilsliga nýtslu.

136. Aðalstjórin kann gera av, at leggja ávís mál um loyvi fyri Sáttmálans lógarásettu nevndir og ráð.

IV.2.5 Krøv og treytir fyri at nýta búmerkið í stuðulshøpi

137. At nýta búmerkið í stuðulshøpi kann loyvast í ymiskum virksemi sum til dømis framførslum, filmsverkum og øðrum sjónbandavirki, útgivnum tilfari, ársfundum, fundum og ráðstevnum, virðislønarhandan og øðrum tjóðar- og altjóða hendingum, eins væl og í arbeiði, sum vísir siðaarv.

138. Mannagongdirnar til at søkja um at sleppa at nýta sáttmálabúmerkið í stuðulshøpi skula útvegast av Avgreiðslustovuni, sambært hesum krøvum og treytum:

(a) Krøv:

i. Ávirkan: nýtsluloyvi kann fáast til óvanligt virksemi, sum trúliga fer at hava stóra ávirkan á varðveitslu av siðaarvi og at gera sáttmálan munandi sjónskari.

ii. Trúvirði: hóskandi vissa skal fáast til vega viðvíkjandi teimum, sum stíla fyri (yrkisligar royndir og umdømi, viðmæli og tilráðingar, lógar- og fíggjartrygd) og fyri virkseminum, sum talan er um (politiskir, løgligir, fíggjarligir og tøkniligir møguleikar).

(b) Treytir:

iii. Í minsta lagi tríggjar mánaðir áðrenn fyrsta dag í ætlaða tíðarskeiðinum skal umsókn um at sleppa at nýta sáttmálabúmerkið í stuðulshøpi sendast til Avgreiðslustovuna; loyvi til at nýta sáttmálabúmerkið í stuðulshøpi verður givið skrivliga og bara av aðalstjóranum.

iv. Tá ið talan er um tjóðarvirksemi, verður avgerðin viðvíkjandi loyvinum at nýta sáttmálabúmerkið við støði í kravdum samráðingum við landinum sum er í økinum, har virksemið skal vera.

v. Sáttmálanum skal verða veitt hóskandi sjónskt pláss, eina mest við at nýta búmerkið.

vi. At nýta sáttmálabúmerkið í stuðulshøpi kann loyvast einstøkum tiltøkum ella tiltøkum, sum eru afturvendandi. Í seinna førinum má tíðarskeiðið vera ásett og loyvið endurnýggjað regluliga.

139. Felagsskapir, bólkar ella, har tað er hóskandi, viðkomandi einstaklingar verða eggjaðir til at nýta sáttmálabúmerkið í samband við síni tiltøk og serligar hendingar til at verja sín siðaarv, sum er nevndur á *Listanum fyri siðaarvi við bráðneygum tørvi á verju* ella *Umboðandi listanum við mannaættarinnar siðaarvi* undir teimum treytum, sum eru nágreinaðar í hesari nýtslureglugerð.

IV.2.6 Handilslig nýtsla og sáttmálabundið virksemi

140. Ein og hvør sáttmálabundin avtala millum Avgreiðslustovuna og felagsskapir uttanífrá, sum skula hava handilsliga nýtslu av sáttmálabúmerkinum (til dømis í eini skipan við samstarvi við privatar partar ella borgarliga samfelagið, og avtalum í samprenti ella felagsframleiðslu ella avtalum við yrkisfólk og persónsmenskur, sum stuðla Sáttmálanum) má fevna um eina fasta áseting, sum ásetur at øll búmerkjanýtsla má verða umbiðin og góðkend skrivliga.

141. Loyvi, sum verða givin í slíkum avtaluskipanum, muga vera avmarkað til tað valda virksemið.

142. At selja vørur og tænastur við sáttmálabúmerki við vinningi fyri eyga verður roknað at vera “handilslig nýtsla” í hesari reglugerð. Ein og hvør handilslig nýtsla av sáttmálabúmerkinum má vera nágreiniliga heimilað av aðalstjóranum í eini ávísari avtaluskipan. Um tann handilsliga nýtslan av búmerkinum er beinleiðis tengd at einum serstøkum fyribrigdi á Listanum, kann aðalstjórin heimila hana eftir ráðlegging við viðkomandi limaland/-lond.

143. Tá ið vinningur, sum er nevndur í greinini omanfyri, er í væntu, skal aðalstjórin tryggja, at grunnurin fyri siðaarv fær sín rímiliga part av umsetninginum, og skal enda eina avtalu viðvíkjandi verkætlanini við avtalu um inntøkur til grunnin. Slíkt íkast til grunnin skal umsitast í samsvar við fíggjarreglugerð fyri grunnin fyri siðaarv.

IV.2.7 Grafisk fyrsisett mát

144. Sáttmálabúmerkið skal endurprentast í samvar við nágreinilig grafisk mát, sum verða útgreinað av Avgreiðslustovuni og almannakunngjørd á heimasíðuni hjá sáttmálanum, og sum ikki skula broytast.

IV.2.8 Verja

145. Í tann mun at búmerki sáttmálans er kunngjørt og góðkent av Paris samveldis limalondum í grein 6ter í París sáttmálanum viðv. verju av vinnuligari ogn, viðtikin í 1883

og endurskoðað í Stokholm í 1967, hevur UNESCO atgongd til skipanir heima hjá París samveldislimalondunum til tess at fyribyrgja, at sáttmálans búmerki verður nýtt, og slík nýtsla av órøttum bendir á samband við UNESCO, sáttmálan og alla aðra misnýtslu.

146. Limalond verða biðin at lata Avgreiðslustovuni nøvn og bústað hjá teimum myndugleikum, sum hava við umsiting av búmerkisnýtslu at gera.

147. Tey, sum biðja um at sleppa at nýta búmerkið á tjóðarstøði verða biðin um at venda sær til teir útvaldu myndugleikarnar á staðnum. Avgreiðslustovan skal upplýsa myndugleikarnar á staðnum um givin loyvir.

148. Í serligum førum kunna sáttmálans lógarásettu nevndir og ráð biðja aðalstjóran hava eftirlit við rættari nýtslu av sáttmálabúmerkinum, og byrja ákærumál ímóti misnýtslu, har tað er hóskandi.

149. Aðalstjórin hevur ábyrgd av at at reisa mál í teimum førum, har óheimilað nýtsla av sáttmálabúmerkinum fer fram á altjóðastøði. Á tjóðarstøði er hetta ábyrgdin hjá viðkomandi myndugleikum á staðnum.

150. Avgreiðslustovan og limalond skula arbeiða tætt saman til tess at fyribyrgja eini og hvørjari óheimilaðari nýtslu av sáttmálabúmerkinum á tjóðarstøði, í samskifti við skikkaðar partar og í tráð við hesa nýtslureglugerð.

## Kap V Fráboðan til Nevndina

V.1 Fráboðan frá limalondum viðvíkjandi íverksetan av Sáttmálanum

151. Hvørt limaland skal regluliga senda Nevndini frágreiðingar um atgerðir gjørdar í lógum og reglugerðum til tess at seta sáttmálan í verk. Limalond verða eggjaði til at økja dátur, sum eru savnaðar viðvíkjandi at seta sáttmálan í verk, við upplýsingum frá viðkomandi ikki-stjórnarligum felagsskapum.

152. Limalond senda sínar regluligu frágreiðingar innan 15. Desember sætta hvørt ár eftir eini umferð øki fyri øki. Raðfylgja í slíkari rundferð verður ásett av Nevndini í byrjanini av regluligu seks ára frágreiðingarumferðini. Limalondini brúka mannagongdina við regluligum frágreiðingum til at styrkja eftirlitspartin, og eisini virkið økissamskifti og samstarv til tess at tryggja munadygga verju av siðaarvi. Oyðiblað ICH-10 skal brúkast til slíkar frágreiðingar; tað kann fyllast út á netinum av einum og hvørjum limalandi (https://ich.unesco.org) og verður endurskoðað við hóskandi millumbilum av Avgreiðslustovuni.

153. Limalandið sendir frágreiðingar um atgerðir gjørdar í lógum og reglugerðum til tess at seta sáttmálan í verk, teirra millum:

(a) skráseting av listum av siðaarvi sum finst í hansara øki, sum lýst í grein 11 og 12 í sáttmálanum;

(b) onnur verjuátøk, sum sipað til í grein 11 og 13 í sáttmálanum, m.a.:

i. føra ein almennan politikk, sum miðar ímóti at fremja siðaarvsamstarv í samfelagnum og at tengja verju saman við ætlaðum virksemi;

ii. fremja vísindaliga, tøkniliga og listarliga gransking við verju fyri eyga;

iii. lætta so nógv sum gjørligt um atgongd til upplýsing um siðaarv við virðing fyri siðvenju, sum treytar atgongd til ávísar partar av honum;

154. Limalandið gevur frágreiðing um tiltøk í lógum, reglugerðum og aðrar atgerðir settar í verk á tjóðarstøði til tess at styrkja stovnsførleikar til at verja siðaarv, sum lýst í grein 13 í sáttmálanum, íroknað:

(a) útnevna ella stovna ein ella fleiri skikkaðar partar til at verja siðaarv;

(b) styrkja stovnar, sum veita útbúgving í umsiting av siðaarvi og í at lata henda arv víðari;

(c) stovna heimildarsøvn fyri siðaarv og skapa, so væl sum gjørligt, lætta atgongd til teirra.

155. Limalandið gevur frágreiðing um tiltøk í lógum, reglugerðum og aðrar atgerðir settar í verk á tjóðarstøði til tess at tryggja størri viðurkenning av og virðing fyri og stuðli til siðaarv, serstakliga tað slagið, sum sipað verður til í grein 14 í Sáttmálanum:

(a) undirvísingar-, vitskuvekjandi og upplýsingarætlanir;

(b) undirvísingar- og venjingarætlanir í áhugaðum bygdum/býum og bólkum;

(c) førleikamennandi virksemi til varðveitslu av siðaarvi;

(d) ikki-formligar mannagongdir til at lata vitan ganga í arv;

(e) útbúgving viðvíkjandi verju av náttúruøkjum og minnisplásssum.

156. Limalandið gevur frágreiðing um tiltøk hann hevur avrikað á tvípartastøði, undirøkisstøði, økisstøði og altjóðastøði til tess at seta sáttmálan í verk, íroknað tiltøk við altjóða samstarvi sum til dømis umbýti av upplýsing og royndum, og onnur felagsframtøk, sum sipað til í grein 19 í sáttmálanum.

157. Limalandið gevur frágreiðing um núverandi standin á øllum pørtum av siðaarvi, sum finst í hansara øki, sum eru á *Umboðandi listanum fyri mannaættarinnar siðaarv*. Limalandið skal serliga geva gætur eftir kynsleiklutum og skal stremba eftir at tryggja størst møguliga luttøku millum felagsskapir, bólkar og, har tað hóskar, áhugaðar einstaklingar, eins væl og ikki-stjórnarligar felagsskapir, tá ið ein fyrireikar slíkar frágreiðingar, sum skula viðgera fyri hvørt fyribrigdi, sum er við:

(a) fyribrigdisins sosiala og mentanarliga virki;

(b) eina meting av tess lívføri og núverandi vandar á tess leið, um nakrir finnast;

(c) tess íkast til *Listans* endamál;

(d) tey tøk, sum eru tikin, til at fremja og styrkja fyribrigdið, serstakliga gjørd átøk, sum kanska hava verið neyðug, tí at fyribrigdið er innskrivað;

(e) luttøku av felagsskapum, bólkum og einstaklingum, eins og viðkomandi ikki-stjórnarligum felagsskapum til at verja fyribrigdið og teirra tilsøgn at framhaldandi vera við í slíkum arbeiði.

158. Limalandið gevur frágreiðing um tann stovnsliga samanhang, sum fyribrigdið á *Umboðandi listanum fyri siðaarv* er partur av, íroknað:

(a) teir skikkaðu partar, sum eru við til at umsita og/ella varðveita;

(b) tann/teir felagsskap/ir í samfelagnum ella áhugabólk, sum hevur áhuga fyri fyribrigdinum og tess varðveitslu.

159. Limalond skula svara stundisliga upp á áheitanir frá Nevndini viðvíkjandi fleiri upplýsingum, um neyðugt og óbundið av tí regluligu umferð, sum Nevndin ásetir, í samsvar við grein 152 omanfyri.

V.2 Fráboðan frá limalondum viðvíkjandi fyribrigdum, sum eru innskrivað á *Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju.*

160. Hvørt limaland skal lata Nevndini frágreiðingar um støðuna hjá fyribrigdum av siðaarvi, sum finnast í teirra øki, sum eru innskrivað á *Listan fyri siðaarvi við bráðneyðugum tørvi á verju*, tá ið hon biður um tað ella, tá ið talan er um sera stóran skund, eftir ráðlegging við hana. Limalandið skal stremba eftir at tryggja størst møguliga luttøku millum felagsskapir, bólkar og, har tað hóskar, áhugaðar einstaklingar, eins væl og ikki-stjórnarligar stovnar, tá ið ein fyrireikar slíkar frágreiðingar.

161. Slíkar frágreiðingar skula vanliga latast nevndini innan 15. desember fjórða árið eftir at fyribrigdið varð innskrivað, og síðani fjórða hvørt ár. Oyðiblað ICH-11 verður brúkt til slíkar frágreiðingar; tað kann fyllast út á netinum av hvørjum limalandi sær (https://ich.unesco.org) og verður endurskoðað við hóskandi millumbilum av Avgreiðslustovuni. Tá ið innskriving fer fram, kann Nevndin áseta serliga tíðarætlan fyri frágreiðingar í hvørjum máli sær, sum gongur fram um ta vanligu fýraára umferðina.

162. Limalandið skal serstakliga geva gætur eftir kynsleiklutum og skal boða frá støðuni hjá fyribrigdinum í løtuni, íroknað:

(a) tess sosiala og mentanarliga virki;

(b) eina meting av tess lívføri og núverandi vandar á tess leið;

(c) úrslitið av tøkum sum eru tikin til at verja fyribrigdið, serstakliga verksetan av tí verjuætlan, sum varð gjørd, tá ið tilnevningin fór fram;

(d) dagføring av verjuætlanini, sum er í tilnevningarumsókini ella í undafarnu frágreiðing;

(e) luttøku av samfeløgum, bólkum og einstaklingum, eins og viðkomandi ikki-stjórnarligum felagsskapum til at verja fyribrigdið og teirra tilsøgn at framhaldandi vera við í slíkum arbeiði.

163. Limalandið gevur frágreiðing um tann stovnsliga samanhang, sum fyribrigdið á *Listanum* er partur av, íroknað:

a) teir skikkaðu partar, sum eru við til at umsita og/ella varðveita tað;

(b) tann/teir felagsskap/ir í samfelagnum ella áhugabólk, sum hevur áhuga fyri fyribrigdinum og tess varðveitslu.

164. Limalond skula svara stundisliga upp á serstakar áheitanir frá Nevndini viðvíkjandi fleiri upplýsingum, um neyðugt millum tey evstamørk, sum eru ásett í grein 161 omanfyri.

V.3 At taka ímóti og viðgera frágreiðingar

165. Tá ið Avgreiðslustovan fær frágreiðingar frá limalondum, skal hon skráseta tær og kvitta fyri móttøku. Um ein frágreiðing er ófullkomin, fær limalandið leiðbeining í at fullgera hana.

166. Avgreiðslustovan framsendir Nevndini eitt yvirlit yvir allar innkomnar frágreiðingar í samsvar við grein 152 fýra vikur áðrenn hennara setu. Yvirlitið verður eisini almannakunngjørt á netinum saman við teimum innkomnu frágreiðingunum í samsvar við grein 152 og 161, á tí máli sum limalondini lótu tær inn, um ikki Nevndin tekur aðra avgerð í undantaksføri.

167. Strikað.

V.4 Frágreiðingar frá londum, sum ikki eru sáttmálapartar, viðvíkjandi fyribrigdum á *Umboðandi listanum við mannaættarinnar siðaarvi.*

168. Greinirnar 157-159 og 165-166 í hesi reglugerð skula vera fult galdandi fyri lond, sum ikki eru partar av sáttmálanum, sum hava fyribrigdi á sínum øki, sum eru útnevnd til Meistaraverk og innskrivað á *Umboðandi listan við mannaættarinnar siðaarvi,* og sum hava játtað at góðtaka rættindi og skyldur, sum fylgja við.

169. Slíkar frágreiðingar skula ikki-partastatir lata nevndini innan 15. desember 2014, og síðani sætta hvørt ár. Oyðiblað ICH-10 verður brúkt til slíkar frágreiðingar; tað kann fyllast út á netinum av hvørjum viðkomandi stati sær. (https://ichunesco.org) og verður endurskoðað við hóskandi millumbilum av Avgreiðslustovuni.

**Kap VI At verja siðaarv og burðardygga menning á tjóðarstøði**

170. Við tí fyri eyga at seta sáttmálan væl í gildi skula limalond stremba eftir – á allan hóskandi hátt – at viðurkenna týdningin av og styrkja leiklutin hjá siðaarvi sum drívmegi og trygd fyri burðardyggari menning, og eisini fult samskipa verju av siðaarvi við teirra menningarætlanir, politikk og ætlanir á øllum stigum. Limalond skula, samstundis sum teir viðurkenna, at verja av siðaarvi og burðardygga menning eru sambundin sínamillum, stremba eftir at halda javnvág ímillum tær tríggjar súlurnar í burðardyggari menning (ta fíggjarligu, ta sosialu og ta umhvørvisligu) og eisini teirra samband við frið og trygd í sínum verjuvirki, og til hetta endamál skula teir skapa samstarv við viðkomandi serfrøðingar, mentanararbeiðarar og millumgongumenn gjøgnum samstarvandi arbeiðslag. Limalond skula viðurkenna, at siðaarvur er máttmikil av natúr bæði í býar- og bygdarsamanhangi, og skula beina sítt verjuarbeiði bara móti tí siðaarvi, sum er sameiniligur við verandi mannarættindaamboð eins væl og krav um sínamillum virðing millum felagsskapir, bólkar og einstaklingar og burðardygga menning.

171. Í tann mun teirra menningarætlanir, politikkur og skráir umfata siðaarv

ella kunna møguliga ávirka hansara lívføri, skula limalond stremba eftir at:

(a) tryggja størst møguliga luttøku av felagsskapum, bólkum og -har tað hóskar- einstaklingum, sum skapa, halda við líka og lata víðari slíkan arv, og taka tey við í tilevning og verksetan av slíkum ætlanum, politikki og skráum;

(b) tryggja at tey felagsskapirnir, bólkarnir og – har tað er hóskandi – einstaklingarnir – sum talan er um fyrst og fremst fáa ágóðan, bæði moralskt og tímiliga, av slíkum ætlanum, politikki og skráum;

(c) tryggja at slíkar ætlanir, politikkur og skráir taka siðalagsligt fyrilit og ikki ávirka lívførið hjá tí siðaarvinum, talan er um, neiliga ella órógva mentanarinnar samanhang ella heimarætt;

(d) lætta um samstarv við serfrøðingar í burðardyggari menning og mentanararbeiðarar til tess at elva til gott samlag ímillum verju av siðaarvi og ætlanir, politikk og skráir, bæði innan fyri og uttan fyri mentanargeiran.

172. Limalond skula stremba eftir fult út at taka til eftirtektar ta møguligu og veruligu ávirkan, sum allar menningarætlanir og skráir hava á siðaarv, serstakliga við at hava

metingarmannagongdir viðvíkjandi umhvørvisligari, sosialari og fíggjarligari og mentanarliga ávirkan.

173. Limalond skula stremba eftir at viðurkenna, fremja og stuðla siðaarv sum eitt týdningarmikið stjórnarligt tilfeingi í burðardyggari menning. Við hesum fyri eyga verða limalond eggjaði til:

(a) at fremja vísindaligar kanningar og granskingarhættir eisini slíkar, sum verða gjørdir av felagsskapum og bólkum sjálvum, sum miða ímóti at skilja teir fjølbroyttu spurningar, sum knýta seg at varðveiting av ymsum rættindum hjá felagsskapum, bólkum og einstaklingum, sum hava við verju av siðaarvi at gera.

(b) at taka í nýtslu hóskandi lógar-, tøkni- , fyrisitingar- og fíggjarligar loysnir, serstakliga við at seta í gildi mentanarlig ognarrættindi, privatlívsrættindi og alt annað slag av lógarverju til tess at tryggja at rættindini hjá felagsskapum, bólkum og einstaklingum, sum skapa, halda uppi og lata frá sær sín siðaarv eru vard á rættan hátt, tá ið tey vekja vitsku um sín arv ella taka lut í handilsligum virksemi.

174. Limalond skula stremba eftir, at teirra verjuætlanir og skráir fevna fult út um allar geirar og øll løg í samfelagnum, íroknað upprunafólk, ferðandi, tilflytarar og flóttafólk, fólk av ymsum aldri og kyni, fólk við skerdum førleika og fólk í viðkvæmum bólkum í samsvar við grein 11 í Sáttmálanum.

175. Limalond verða eggjaði til at fremja vísindaligar kanningar og granskingarhættir eisini slíkar, sum verða gjørdir av felagsskapum og bólkum sjálvum og av ikki-stjórnarligum felagsskapum, sum miða ímóti at fata íkastið hjá siðaarvi til burðardygga menning og týdning hansara sum tilfeingi, tá ið talan er um menningarspurningar og ímóti at lýsa hansara virði við greiðari próvførslu  og eisini hóskandi mátingum um møguligt.

176, Limalond skula stremba eftir at tryggja, at innskriving av siðaarvi á listar hjá Sáttmálanum, sum ásett í grein 16 og 17 í Sáttmálanum, og at úrvalið av teimum bestu verjuhættunum, sum ásett í grein 18 í Sáttmálanum, verða brúkt til at fremja Sáttmálans endamál um verju og burðardygga menning og ikki misnýtt til skaða fyri siðaarvin og felagsskapir, bólkar ella viðkomandi einstaklingar, serstakliga til at fáa løtuvinning.

## VI.1 Fevnandi sosial menning

177. Limalond verða eggjaði til at viðurkenna, at fevnandi sosial menning umfatar mál sum burðardygga matvørutrygd, dygdargóða heilsurøkt, dygdargóða skúlagongd fyri øll, kynsjavnstøðu og atgongd til gott og reint vatn og kloakkviðurskifti, og at hesi mál skula byggja á fevnandi stjórn og fólks frælsi til at velja síni egnu virði.

VI.1.1 Matvørutrygd

178. Limalond skula stremba ímóti at tryggja viðurkenning av, virðing fyri teimum og stuðli til teirra, sum velta, fiska, veiða, hava kríatúr á beiti, savna mat, fyrireika mat og súlta ella á annan hátt varðveita mat og teirra vitan og royndum, eins væl og teirra siðum og trúgv, sum veita matvørutrygd og hóskandi føðslu, og sum eru góðtikin av felagsskapum, bólkum og í summum førum einstaklingum sum partur av teirra siðaarvi. Við tí fyri eyga verða statssáttmálapartar eggjaðir til:

(a) at fremja vísindaligar kanningar og granskingarhættir eisini slíkar, sum verða gjørdir av felagsskapum og bólkum sjálvum, sum miða ímóti at skilja fjølbroytni í hesi vitan og hesum siðvenjum, ávísa teirra virknað, eyðmerkja og birta uppundir, at tær eru við til at uppihalda lívfrøðiligt fjølbroytni við at útvega matvørutrygd og styrkja mótstøðuføri ímóti veðurlagsbroytingum.

(b) at nýta hóskandi lógarlig, tøknilig, fyrisitingarlig og fíggjarlig tiltøk, eisini gamlan sið ella siðalag til at fremja og/ella stýra atgongd til landbúnað, fiskarí, veiðu, beiti og matsavnan, matgerð, vitan og siðvenju viðvíkjandi súlting og aðrari matvarðveitslu, sum eru góðtikin av felagsskapum, bólkum og í summum førum einstaklingum sum partur av teirra siðaarvi, eins væl og javnt býti av ágóðanum, sum kemur burturúr og tryggja at slík vitan og royndir verða latin í arv;

(c) at nýta hóskandi lógarlig, tøknilig, fyrisitingarlig og fíggjarlig tiltøk til tess at góðkenna og virða siðbundin rættindi hjá felagsskapum og bólkum til tey lands-, sjóar- og skógarvistskipanir, sum eru neyðugar til teirra landbúnað, fiskarí, beiti og vitan og siðvenju viðvíkjandi matsavnan, sum eru góðtikin av felagsskapum, bólkum, og í summum førum einstaklingum sum partur av teirra siðaarvi.

VI.1.2 Heilsurøkt

179. Limalond skula stremba ímóti at tryggja viðurkenning av, virðing fyri og stuðli til heilsusiðvanar, sum eru góðkendir av felagsskapum, bólkum og í summum førum einstaklingum sum partur av teirra siðaarvi, og sum økir teirra trivnað, og eisini ta vitan, sum hoyrir til, ílegutilfeingi, siðvenjur, máliskur, ritual og trúgv og at brúka teirra møguleikar at útinna góða heilsurøkt til øll. Við tí fyri eyga verða teir eggjaðir til:

(a) at fremja vísindaligar kanningar og granskingarhættir - eisini slíkar, sum verða gjørdir av felagsskapum og bólkum sjálvum, sum miða ímóti at skilja fjølbroytnið í heilsurøktarsiðvenjum, sum eru góðkendar av felagsskapum, bólkum og í summum føri einstaklingum sum partur av teirra siðaarvi, vísandi teirra virki og virknað og ávísandi teirra part av heilsurøktartørvinum;

(b) at nýta hóskandi lógarlig, tøknilig, fyrisitingarlig og fíggjarlig tiltøk í samráð við tey, sum hava vitanina, náttúrulæknar og tey sum arbeiða við slíkum til at lætta

um atgongdina til grøðivitan og náttúrutilfar, luttøku í grøðivirksemi og at slík vitan og slíkt virksemi, sum eru góðtikin av felagsskapum, bólkum og í summum førum einstaklingum sum partur av teirra siðaarvi, fer í arv - við virðing fyri at siðvenja stýrir atgongd til ávísar partar av hesum;

(c) stuðla upp undir samstarv og heildarloysnir millum margfeldið av heilsurøktarsiðvenjum og skipanum.

VI.1.3 Dygdargóð útbúgving

180. Limalond skula, hvør í síni útbúgvingarskipan og -politikki, stremba eftir, at – á allan hóskiligan hátt – at tryggja viðurkenning av, virðing fyri, og stuðul til siðaarv í samfelagnum, leggjandi dent á hansara serliga leiklut, tá ið virði og lívssnildir skula ganga í arv, og hansara íkast til burðardygga menning, serstakliga við ávísum undirvísingar- og venjingarætlanum í viðkomandi felagsskapum og bólkum og við óformligari vitanardeiling. Við tí fyri eyga verða limalond eggjaði til:

(a) at nýta hóskandi lógarlig, tøknilig, fyrisitingarlig og fíggjarlig tiltøk til tess at:

i. tryggja at skúlaskipanir fremja virðing fyri einum sjálvum, eins samfelagi ella bólki, sínamillum virðing við onnur og ikki á nakran hátt styggja fólk frá sínum siðaarvi ella siga, at teirra samfelag ella bólkur er ikki partur av nútíðarlívi ella á nakran hátt skala ímyndina av teimum;

ii. tryggja at siðaarvur verður so heilt sum gjørligt vovin inn í innihaldið í undirvísingarætlanum í øllum viðkomandi lærugreinum, bæði sum sjálvstøðugt íkast og sum amboð til at greiða frá ella lýsa onnur evni í tímatalvuni, í tvørgreinahøpi og uttan fyri tímatalvu;

iii. viðurkenna týdningin, saman við nýskapandi verjuháttum, av mátum og háttaløgum í arvatilgongdini hjá siðaarvi, sum sjálv verða viðurkend í bygd/býi, bólki og í summum førum einstaklingum sum partur av teirra siðaarvi og royna at gagnnýta teirra møguleikar í formligum og óformligum útbúgvingarskipanum.

(b) at stuðla samstarv og heildarloysnir millum tær fjølbroyttu skúlaskráir og skúlaskipanir;

(c) at fremja vísindaligar kanningar og granskingarhættir eisini slíkar, sum verða gjørdir av felagsskapum og bólkum sjálvum, sum miða ímóti at skilja tey fjølbroyttu námsfrøðiligu háttaløg, sum verða góðkend av felagsskapum, bólkum og í summum førum einstaklingum sum partur av teirra siðaarvi og meta um teirra virknað, og um tey hóska til at flættast inn í annað undirvísingarsamband;

(d) fremja útbúgving í varðveitslu og burðardyggari nýtslu av lívfrøðiligum margfeldni og verju av náttúruøkjum og minnisplássum, sum eru neyðug fyri at bera fram siðaarv.

VI.1.4 Kynsjavnstøða

181. Limalond skula stremba eftir at menna størri kynsjavnstøðu í tilfari í siðaarvi og hansara verju og at burturbeina kynsmismun - viðurkennandi, at felagsskapir og bólkar lata síni virði, fyrimyndir og vónir viðvíkjandi kyni til næsta ættarlið gjøgnum siðaarv, og tað er sostatt eitt avmarkað serumhvørvi, har samleiki hjá limum í bólkum og felagsskapum verður tilevnaður. Við tí fyri eyga verða limalondini eggjaði til:

(a) at gagnnýta møguleikarnar í siðaarvi og hansara verju til at skapa felagsrúm til samtalu um, hvussu ein á bestan hátt fær kynsjavnstøðu, havandi í huga tey ymisku sjónarhornini hjá øllum áhugapørtum;

(b) at leggja dent á tann stóra týdning, sum siðaarvur og hansara verju kann hava til at skapa sínamillum virðing í felagsskapum og bólkum, har fólk kanska ikki hava somu uppfatan av kyni;

(c) at hjálpa felagsskapum og bólkum við at kanna framsagnir siðaarvsins viðvíkjandi teirra ávirkan og møguliga íkast til at styrkja kynsjavnstøðu og at brúka úrslit av hesi kanning í avgerðum viðvíkjandi at verja, útinna, lata í arv og stimbra hesar framsagnir á altjóða pallinum;

(d) at fremja vísindaligar kanningar og granskingarhættir - eisini slíkar, sum verða gjørdir av felagsskapum og bólkum sjálvum, sum miða ímóti at skilja fjølbroyttar kynsleiklutir í ávísum framsagnum í siðaarvi;

(e) tryggja kynsjavnstøðu í fyrireiking, fyrisiting og verkseting av verjutiltøkum á øllum stigum og í øllum samanhangi, til tess at fáa fulla nyttu av teimum ymisku sjónarhornunum hjá øllum í samfelagnum.

VI.1.5 Atgongd til reint og gott vatn og burðardygga vatnnýtslu

182. Limalond skula stremba eftir at tryggja, at tær vatnnýtsluskipanir eru nýtiligar, sum eru góðkendar av felagsskapum, bólkum og í summum førum einstaklingum sum partur av teirra siðaarvi, og sum fremja javnbjóðis atgongd til gott drekkivatn og burðardygga vatnnýtslu, serstakliga í landbúnað og øðrum tilveruvirksemi. Við tí fyri eyga verða limalond eggjaði til at:

(a) at fremja vísindaligar kanningar og granskingarhættir - eisini slíkar, sum verða gjørdir av felagsskapum og bólkum sjálvum, sum miða ímóti at skilja fjølbroytnið í teimum vatnnýtsluskipanum, sum eru góðkendar av bygdum/býum, bólkum og í summum førum einstaklingum sum partur av teirra siðaarvi, og eyðmerkja

teirra lut í at uppfylla umhvørvisligan og vatntengdan menningartørv, og eisini hvussu teirra mótstøðuføri kann styrkjast í veðurlagsbroytingunum.

(b) at nýta hóskandi lógarlig, tøknilig, fyrisitingarlig og fíggjarlig tiltøk til tess at eyðmerkja, styrkja og arbeiða fyri slíkum skipanum til tess at lofta vatntørvi og veðurlagsavbjóðingum á staðnum, á tjóðarstigi og altjóða stigi.

## VI.2 Umfatandi fíggjarlig menning

183. Limalond verða eggjaði til at viðurkenna, at verja av siðaarvi er eitt íkast til fevnandi fíggjarmenning og at viðurkenna í hesum samanhangi at burðardygg menning byggir á støðugan, rættvísan og fevnandi fíggjarvøkstur við støði í burðardyggum framleiðslumynstrum og brúki og krevur, at minkað verður um fátækdømi og ójavna, gevandi og sømilig arbeiðspláss, eins og atgongd til rímiliga ódýra, støðuga, burðardygga, varandi og nýmótans orku til øll og at framhaldandi minka um oyðsl í nýtslu og framleiðslu.

184. Limalond skula stremba eftir at gagnnýta siðaarv fult út sum eina máttmikla kraft til fevnandi og rættvísa fíggjarmenning, umfatandi fjølbroytt framleiðsluvirksemi bæði við pengaligum virði og ikki-pengaligum virði og gevandi sítt serliga ískoyti til at styrkja lokalan búskap. Við tí fyri eyga verða limalond eggjaði til at virða hetta slagið av arvi og tær serligu umstøður í viðkomandi felagsskapum, bólkum og í summum førum hjá einstaklingum, serstakliga um tey velja felags- ella einstaklings fyrisiting av sínum arvi, samstundis sum teimum verða fingnar neyðugar umstøður til at útinna sínar kreativu framsagnir, og samstundis sum arbeitt verður fyri rættvísum handli og siðiligum fíggjarsambondum.

### VI.2.1 Inntøkuskapan og burðardygt lívsgrundarlag

185. Limalond skula stremba eftir at viðurkenna, arbeiða fyri og styðja siðaarvsins íkast til inntøkuskapan og burðardygt lívsgrundarlag hjá felagsskapum, bólkum og einstaklingum. Við tí fyri eyga verða limalond eggjaði til:

(a) at fremja vísindaligar kanningar og granskingarhættir - eisini slíkar, sum verða gjørdir av felagsskapum og bólkum sjálvum, sum miða ímóti at eyðmerkja og meta um møguleikar, sum siðaarvur hevur at skapa inntøkur og burðardygt lívsgrundarlag í viðkomandi felagsskapum, bólkum og hjá einstaklingum, við serligum atliti til at hann kann vera viðbót til aðra inntøku;

(b) at nýta hóskandi lógarlig, tøknilig, fyrisitingarlig og fíggjarlig tiltøk til til tess at:

i. arbeiða fyri, at tað skal vera møguligt hjá felagsskapum, bólkum og einstaklingum at skapa inntøku og lívbjarga sær, so at tey fáa útint, latið í arv og varðveitt sín siðaarv á burðardyggan hátt ;

ii. vissa sær, at viðkomandi felagsskapir, bólkar og einstaklingar eru tey, sum fyrst og fremst fáa ágóða av sínum egna siðaarvi, og at hann verður ikki tikin frá teimum, og als ikki til at skapa inntøkur fyri onnur.

VI.2.2 Skapandi starv og sømiligt arbeiði

186. Limalond skula stremba eftir at viðurkenna, arbeiða fyri og styðja siðaarvsins íkast til skapandi starv og sømiligt arbeiði í viðkomandi felagsskapum, bólkum og hjá einstaklingum. Við tí fyri eyga verða limalond eggjaði til:

(a) at fremja vísindaligar kanningar og granskingarhættir - eisini slíkar, sum verða gjørdir av felagsskapum og bólkum sjálvum, sum miða ímóti at eyðmerkja og meta um møguleikar, sum siðaarvur hevur at bjóða av skapandi starvi og sømiligum arbeiði í viðkomandi felagsskapum, bólkum og hjá einstaklingum, við serligum atliti til, hvussu hann kann lagast til familju- og húsarhaldsumstøður og til annað arbeiði;

(b) at nýta hóskandi lógarlig, tøknilig, fyrisitingarlig og fíggjarlig tiltøk til til tess at:

i. fremja skapandi starv og sømiligt arbeiði í felagsskapum, bólkum og hjá einstaklingum við at útinna og lata í arv sín siðaarv, samstundis sum tey vera umfatað av vernd og almannaveitingum;

ii. vissa sær, at viðkomandi felagsskapir, bólkar og einstaklingar eru tey, sum fyrst og fremst fáa ágóða av arbeiðsmøguleikum í sínum egna siðaarvi, og at hann verður ikki tikin frá teimum, og als ikki til at skapa inntøkur fyri onnur.

VI.2.3 Ávirkan av ferðavinnu á varðveitslu av siðaarvi og øvugt.

187. Limalond skula stremba eftir at tryggja, at alt ferðavinnuvirksemi, tað veri seg skipað av landinum, tí almenna ella privatum pørtum, vísir alla hóskandi virðing fyri verju av siðaarvi, sum finst í teirra øki og fyri rættindum, tráan og ynskjum í felagsskapir, bólkum og hjá einstaklingum, sum hava við tað at gera. Við tí fyri eyga verða limalond eggjaðir til:

(a) at meta um, bæði alment og nágreiniliga áðrenn virksemið er byrjað, í hvønn mun siðaarvur kann vera partur av burðardyggari ferðavinnu og ávirkanina, ferðavinnan hevur á siðaarv og burðardygga menning av felagsskapum, bólkum og einstaklingum, sum talan er um, serstakliga við atliti til at duga at síggja vandan fyri ávirkan, áðrenn virksemið er byrjað;

(b) at nýta hóskandi lógarlig, tøknilig, fyrisitingarlig og fíggjarlig tiltøk til til tess at:

i. vissa sær, at viðkomandi felagsskap, bólkar og einstaklingar eru tey, sum fyrst og fremst fáa ágóða av ferðavinnu, sum nýtir teirra egna siðaarv, samstundis, sum arbeitt verður fyri, at tey hava høvuðsleiklutin í fyrisitingini av slíkari ferðavinnu;

ii. vissa sær, at hesin arvur á ongan hátt verður minkaður ella hóttur, hvørki hansara lívføri, sosiali leiklutur ella mentanarliga merking.

iii. stýra uppílegging teirra, sum eru í ferðavinnuídnaðinum og atburði teirra, sum eru uppií sum ferðafólk.

## VI.3 Umhvørvisburðardygd

188. Limalond verða eggjaði til at viðurkenna, at verja av siðaarvi er við til at fremja umhvørvisburðardygd og at ásanna, at umhvørvisburðardygd krevur, at náttúrutilfeingi verður umsitið á burðardyggan hátt, eins og varðveitsla og umhvørvisburðardygg nýtsla av lívfrøðiligum margfaldni, sum – á hin bógvin – kundi vunnið við betri vísindaligari fatan og vitanardeiling um veðurlagsbroytingar, náttúruvanlukkur, umhvørvisligar og natúrligar tilfeingisavmarkingar, og at tað er týdningarmikið at styrkja mótstøðuførið hjá viðkvæmum fólkum, sum standa andlit til andlits við veðurlagsbroytingar og náttúruvanlukkur.

### VI.3.1 Vitan og verk viðvíkjandi náttúruni og alheiminum

189. Limalond skula stremba eftir at tryggja viðurkenning av, virðing fyri, deilig av og stuðli til vitan og verk viðvíkjandi alheiminum, sum eru viðurkend av felagsskapum, bólkum og í summum føri einstaklingum sum partur av teirra siðaarvi, og sum eru íkast til umhvørvisburðardygd, ásannandi at tey eru før fyri at mennast, nýtandi sín møguleika at vera við til at tryggja lívfrøðiligt margfeldi og í burðardyggari fyrisiting av náttúrutilfeingi. Við tí fyri eyga verða limalond eggjaði til :

(a) at viðurkenna felagsskapir, bólkar og einstaklingar, sum berarar av vitan um náttúru og alheimin og sum týdningarmiklar spælarar í at uppihalda umhvørvið;

(b) ) at fremja vísindaligar kanningar og granskingarhættir - eisini slíkar, sum verða gjørdir av felagsskapum og bólkum sjálvum, sum miða ímóti at fata skipanir til at varðveita lívfrøðiligt margfeldi, umsiting av náttúrutilfeingi og burðardyggari tilfeingisnýtslu, sum eru góðkendar av felagsskapum, bólkum og í summum føri einstaklingum sum partur av teirra siðaarvi, og at vísa at tær virka, og samstundis arbeiða fyri altjóðasamstarvi við at finna og deila tær góðu royndirnar.

(c) at nýta hóskandi lógarlig, tøknilig, fyrisitingarlig og fíggjarlig tiltøk til til tess at:

i. fremja atgongd til og flutning millum ættarlið av siðbundnari vitan um náttúruna og alheimin við virðing fyri siðum, sum stýra atgongd til ávísar partar av henni;

ii. varðveita og verja tey náttúruøki, sum eru neyðugir partar av framsøgn hjá siðaarvi.

### VI.3.2 Umhvørvisávirkan av at verja siðaarv

190. Limalond skula stremba ímóti at viðurkenna møguliga og veruliga ávirkan av útinnan og verju av siðaarvi við serligum atliti til møguligar fylgjur, um meira verður gjørt av. Við tí fyri eyga verða limalond eggjaði til:

(a) at fremja vísindaligar kanningar og granskingarhættir - eisini slíkar, sum verða gjørdir av felagsskapum og bólkum sjálvum, sum miða ímóti at skilja slíka ávirkan;

(b) at nýta hóskandi lógarlig, tøknilig, fyrisitingarlig og fíggjarlig tiltøk til til tess at stuðla uppundir umhvørvisvinarliga útinnan og verju og at minka um møguliga skaðiliga ávirkan.

### VI.3.3 Samfelagsins mótstøðuføri í náttúruvanlukkum og veðurlagsbroytingum

191. Limalond skula stremba eftir at viðurkenna, virða og stuðla vitan um og útinnan av jarðarvísindum serstakliga veðurlagnum og brúka sínar førleikar at hjálpa til at minka um vandan fyri náttúruvanlukkum og at endurreisa eftir vanlukkur, serliga við at styrkja sosialan samanhang og minka um ávirkan av veðurlagsbroytingum. Við tí fyri eyga verða limalond eggjaði til:

(a) viðurkenna felagsskapir, bólkar og einstaklingar sum berarar av siðbundnari vitan um jarðarvísindi, serstakliga veðurlag.

(b) at fremja vísindaligar kanningar og granskingarhættir - eisini slíkar, sum verða gjørdir av felagsskapum og bólkum sjálvum, sum miða ímóti at skilja og vísa á at vitan um avmarking av vanlukkuváða, endurreising eftir vanlukku, veðurlagstillaging og minking av veðurlagsbroytingum, sum er góðkend av felagsskapum, bólkum og í summum førum einstaklingum sum partur av teirra siðaarvi, virkar, og samstundis stuðla førleikar í felagsskapum, bólkum og hjá einstaklingum til at møta avbjóðingum í veðurlagsbroytingum, sum verandi vitan ikki umfatar;

(c) at nýta hóskandi lógarlig, tøknilig, fyrisitingarlig og fíggjarlig tiltøk til til tess at:

i. fremja atgongd til og flutning millum ættarlið av siðbundnari vitan um jørðina og veðurlagið, sum er góðkend av felagsskapum, bólkum og í summum føri einstaklingum sum partur av teirra siðaarvi - við virðing fyri siðvenjum, sum stýra atgongd til ávísar partar av honum;

ii. lata felagsskapir, bólkar og einstaklingar, sum eru berarar av slíkari vitan vera partur av skipanum og skráum viðvíkjandi minking av vanlukkuváða, endureising eftir vanlukku og tillaging til og minking av veðurlagsbroyting.

VI.4 Siðaarvur og friður

192. Limalond verða eggjaði til at viðurkenna, at verja av siðaarvi er við til at fremja friðarlig, rættvís og fevnandi samfeløg, sum byggja á virðing fyri mannarættindum (íroknað rættin til at mennast) og eru leys av ræðslu og harðskapi. Burðardygg menning fæst ikki í lag uttan frið og trygd; og friður og trygd eru í vanda, um burðardygg menning ikki er.

193. Limalond skula stremba eftir at viðurkenna, arbeiða fyri og stuðla tí virki, framløgum og framsagnum av siðaarvi, sum hava friðargevandi og friðarbyggjandi kjarna, sum savna felagsskapir, bólkar og einstaklingar og tryggja samskifti, samrøðu og skil teirra millum. Limalond skula harafturat stremba eftir at skilja til fulnar tað íkast, sum verjutiltøk hava í friðarbygging.

VI.4.1 Sosial samanhangsmegi og rættvísi

194. Limalond skula stremba eftir at viðurkenna og arbeiða fyri, at siðaarvur gevur sítt íkast til sosialan samanhang, basir allari diskriminatión og styrkir tann sosiala bygnaðin í felagsskapum og bólkum á fevnandi hátt. Við tí fyri eyga verða limalond eggjaði til at veita serligt atlit til tað virki, tær framsagnir og ta vitan, sum hjálpa felagsskapum, bólkum og einstaklingum at hevja seg uppum og viðgera ymiskleika í kyni, liti, etnisiteti, uppruna, stætt, og staðseting og atlit til virki, sum fevnir breitt í øllum pørtum og løgum í samfelagnum, sum til dømis upprunafólk, ferðandi, innflytarar og flóttafólk, fólk í ymsum aldri og kyni, fólk við breki og fólk í lítisvirdum bólkum.

VI.4.2 At fyribyrgja og loysa ósemjur

195. Limalond skula stremba eftir at viðurkenna, arbeiða fyri og stuðla íkasti, sum siðaarvur kann geva til fyribyrging av ósemjum og friðarligar loysnir av ósemjum. Við tí fyri eyga verða limalond eggjaði til:

(a) at fremja vísindaligar kanningar og granskingarhættir - eisini slíkar, sum verða gjørdir av felagsskapum og bólkum sjálvum, sum miða ímóti at sýna framsagnir,

framsýningar og lýsingar av siðaarvi sum íkast til at fyribyrgja ósemjur og friðarliga loysn av ósemjum;

(b) at mæla til at nýta hóskandi lógarlig, tøknilig, fyrisitingarlig og fíggjarlig tiltøk til:

i. at stuðla slíkum framsagnum, framsýningum og lýsingum;

ii. at seta tær inn í almennar ætlanir og politikk;

iii. at minka um teirra viðkvæmi, meðan stríð er og aftaná;

iv. at meta tær sum amboð saman við øðrum lógar- og fyrisitingaramboðum til at fyribyrgja ósemjur og loysa ósemjur á friðarligan hátt;

VI.4.3 Endurskapa frið og trygd

196. Limalond skula stremba ímóti at gagnnýta fult út møguleikarnar í siðaarvi at endurskapa frið, til sáttargerð millum partar, at endurbyggja tryggleika og trygd og at endurreisa felagsskapir, bólkar og einstaklingar. Við tí fyri eyga verða limalond eggjaði til:

(a) at fremja vísindaligar kanningar og granskingarhættir - eisini slíkar, sum verða gjørdir av felagsskapum og bólkum sjálvum, sum miða ímóti at skilja, hvussu siðaarvur kann vera við til at endurskapa frið, til sáttargerð millum partar, at endurbyggja tryggleika og trygd og at endurreisa felagsskapir, bólkar og einstaklingar;

(b) at fremja lógarlig, tøknilig, fyrisitingarlig og fíggjarlig tiltøk til at at seta slíkan siðaarv inn í almennar ætlanir og politikk, sum miðar ímóti at endurskapa frið, sáttargerð millum partar, at endurbyggja tryggleika og trygd og at endurreisa felagsskapir, bólkar og einstaklingar;

VI.4.4 Náa varandi frið

197. Limalond skula stremba eftir at viðurkenna, arbeiða fyri og stuðla íkasti, sum siðaarvur gevur felagsskapum, bólkum og einstaklingum til at skapa varandi frið. Við tí fyri eyga verða limalond eggjaði til:

(a) at tryggja virðing fyri siðaarvi hjá upprunafólki, ferðandi, innflytarum og flóttafólki, fólki í ymiskum aldri og kyni, fólki við breki og fólki í viðkvæmum bólkum í teirra verjuroyndum;

(b) at gagnnýta fult út tað íkast, sum verja av siðaarvi veitir fólkastýri og mannarættindum við at tryggja so stóra luttøku sum gjørligt av felagsskapum, bólkum og einstaklingum;

(c) at fremja møguleikar fyri friðarbygging í verjuátøkum, sum fevna um millummentanarliga samrøðu og virðing fyri mentanarligum fjølbroytni